# FRØÐI

*1 / 2023 30. árg. kr. 48,-*

LES EISINI

**FLATMAÐKURIN –** GESTURIN, IÐ ONGANTÍÐ FÓR HEIM AFTUR **S. 4**

**FØROYSK RÆTTSKRIVING** ER FRÁ 1847 – IKKI 1846 **S. 10**

**FÝRA SLØG** AV RÆPLANTUM Í FØROYUM **S. 14**

**GAMLA BÓNDASAMFELAGIÐ** KUNDI IKKI VELTA MEIRA KORN **S. 17**

**KANNINGAR AV SJÓSÍLUM** VARPA LJÓS Á NÝGGJA VITAN **S. 23**

**IKKI ALLAR KLUKKUR** ERU LANDDJÓR **S. 27**

**GARÐSNIGIL** – AFTUR EIN FERÐANDI VIÐ ONGUM PASSI **S. 37**

## GRIÐSTAÐIR Í FØROYUM

*– dømd runnu seg til frælsi*



9 771395 004003

# Frøði hesaferð!

Vit hava óbodnar gestir í føroysku náttúruni, ið ikki eru serliga góðir fyri vistfrøðiligu javnvágna. Ein av hesum óbodnu gestunum er flatmaðkurin. Hann týnir reyðmaðkin, ið hevur hildið gongd í vistskipanini. Tríggir næmingar á tilfeingisbreytini á Miðnámi í Vestmanna hava skrivað um útbreiðsluna av flatmaðkinum og staðfesta í greinini, nær flatmaðkurin kom til ymsu oyggjarnar, og hvørja ávirkan hann hevur havt.

Tað er almenn hugsan í Føroyum, at V.U. Hammershaimb prestur tilevnaði føroysku stavsetingina í 1846. Málgranskarin Seán D. Vrieland hevur gjørt rannsóknir í hesum sambandi. Eitt bræv, varðveitt á íslendska landsbókasavninum, avdúkar, at føroysk rættskriving ikki var til fyrr enn í 1847. Møguliga varð hon gjørd eftir bara tveimum vikum. Í hvussu er skal føðingarárið hjá føroysku rættstavingini broytast til 1847.

Drúgvi og trúfasti høvundurin hjá Frøði, Jens-Kjeld Jensen, hevur tvær greinar í hesum blaðnum. Tann fyrra er um tað fjórða slagið av ræplantum, sum nú er funnið. Hin greinin er um garðsnigilin. Høvuðsevnið er tað sama sum í greinini um flatmaðkin. Jens-Kjeld skrivar, at vit frætta alsamt um nýggj innslødd sløg av skordýrum, sniglum, plantum og øðrum, sum eru funnin í Føroyum. Hesi sløgini høvdu helst verið nógv færri, um Føroyar høvdu eina nútímans náttúruverndarlóg.

Tað gamla bóndasamfelagið lagaði seg til natúrligu og samfelagsligu umstøðurnar, ið vóru í Føroyum fyrst í 1800. Men henda skipanin var ikki før fyri at breyðføða fólkið í Føroyum, og tí var neyðugt at innflyta nógv korn. Rolf Guttesen skrivar, at innflutningurin av korni var størri, enn handilin metti vera neyðugt, og myndugleikarnir vildu tí hava føroyingar at velta meira korn. Ein niðurstøða hjá høvundinum er, at umstøður og orka vóru ikki í Føroyum at velta meira korn.

Støðugt fleiri upplýsingar koma undan kavi um atferðina hjá føroyskum sjósílum. Fiskaaling hevur seinastu fýra árini gjørt kanningar av hesum sílunum. Tað er ymiskt, nær tey fara á sjógv, men munurin á vøkstri á sílum, ið fara fyrr á sjógv, sammett við vøksturin á sílunum, ið eru longur í feskum vatni, er týðiligur. Eisini benda kanningarnar á, at sílini sjálv avlúsa seg í feskum vatni.

Tá ið klukkur verða nevndar, hugsa fólk flest um tær heldur stóru og skjótu svartaklukkurnar. Men ikki allar klukkur eru landdjór. Agnes-Katharina Kreiling og Leivur Janus Hansen skriva um vatnklukkuættir. Summar klukkur liva í hyljum, áum og øðrum vátum umhvørvi. Í minsta lagi seytjan sløg av vatnklukkum eru at finna í Føroyum, og í greinini gjøgnumganga tey í stuttum hesi sløgini við nýliga tilevnaðu føroysku nøvnum teirra.

Í Føroyum eru fleiri sagnir um støð, har fólk í gomlum døgum kundu fáa grið, um tey vóru dømd fyri álvarsom brotsverk. Fleiri av hesum støðum hava nøvn, sum antin í fyrra ella seinna liði kunnu setast í samband við gamla trúgv. Í forkunnugari grein um hesi viðurskifti greiðir Jon S. Hansen frá trimum griðstøðum í Føroyum. Søgufrøðingar vita ikki um tílík støð í hinum norðurlondunum, men dømi eru úr Hetlandi, sum kunnu geva okkum nærri vitan um, hvussu griðskipanin í Føroyum virkaði.

Góðan lesihug og gott summar!


FRØÐI 1 / 2023

NORÐURLENDSKT UMHVØRVISMERKI
Svanamerktur prentlutur 541 705

FØROYA FRÓÐSKAPARFELAG
GEVUR FRØÐI ÚT


© Føroya Fróðskaparfelag og høvundarnir.


Frøði er fólksligt vísindablað, sum kemur út tvær ferðir árliga.

Upplag 1.300
ISSN 1395-0045
Forsíðumynd: Páll J. Nolsøe og Annefía í Vági á Landsskjalasavninum eina ferð í 1970-unum
*Loyvt er at endurgeva úr Frøði, um víst verður til heimildina. Verða heilar greinir endurgivnar, má avtala gerast.*

AVGREIÐSLA
Jarðfeingi, J. Paturssonargøta 32-34
Postsmoga 3059
FO-110 Tórshavn
Tlf. 357000
teldupostur: frodi@jf.fo

RITSTUÐLAR
Fróðskaparsetur Føroya
Tjóðskjalasavnið
Tjóðsavnið
Landsbókasavnið
Havstovan
Heilsufrøðiliga Starvsstovan
Jarðfeingi
Umhvørvisstovan

NÝGGIR HALDARAR
kunnu tekna seg hjá avgreiðsluni.

ELDRI ÚTGÁVUR AV FRØÐI
fáast við at venda sær til avgreiðsluna.

GREINIR TIL BLAÐIÐ
Fólksligar, vísindaligar greinir kunnu sendast ritstjórnini. Skrivlig høvundsleiðbeining fæst frá avgreiðsluni.

LÝSINGAR TIL FRØÐI
Er áhugi fyri at lýsa í blaðnum, setið tykkum tá í samband við avgreiðsluna,
telefon 357000
fax 357001
teldupostur: frodi@jf.fo

LÝSINGARPRÍSUR
Heil síða:kr. 5.000,-
Hálv síða:kr. 3.000,-

RITUMBOÐSRÁÐIÐ
Erling Isholm, Fróðskaparsetur Føroya
Erla Olsen, Fróðskaparsetur Føroya
Sámal Tróndur Johansen, Tjóðskjalasavnið
Bjørg Mikkelsen, Heilsufrøðiliga Starvsstovan
Katrin Hoydal, Umhvørvisstovan
Lis Mortensen, Jarðfeingi
Eilif Gaard, Havstovan
Unn Patursson, Føroya Landsbókasavn

GRAFISK FRAMLEIÐSLA
OG PRENT: Føroyaprent

SAMSKIPARI
Helgi Jacobsen

RITSTJÓRN
Erling Isholm, *ábyrgd*
Birgitta Andreasen
Sissal Maria Rasmussen
Maria Nielsdóttir
Sissal Vágsheyg Erenbjerg

FRÓÐSKAPARFELAG FØROYA
Heimasíða: www.frodskaparfelag.fo
Limagjald: 300 krónur um árið, at gjalda á kontu í Eik Banka 9181-495.171.0
SWIFT code: EIKBFOTF,
Iban-no: F056 9181 0004 9517 10
*Minnist til at viðmerkja navn.*





10


44


34

# INNIHALD


4 FLATMAÐKURIN – GESTURIN, IÐ ONGANTÍÐ FÓR HEIM AFTUR
Jenny Eik Eyðtórsdóttir
Ronja í Eyðansstovu
Sóley Rein

10 FØROYSK RÆTTSKRIVING ER FRÁ 1847 – IKKI 1846
Seán D. Vrieland

14 FÝRA SLØG AV RÆPLANTUM Í FØROYUM
Jens-Kjeld Jensen

17 GAMLA BÓNDASAMFELAGIÐ KUNDI IKKI VELTA MEIRA KORN
Rolf Guttesen

23 KANNINGAR AV SJÓSÍLUM VARPA LJÓS Á NÝGGJA VITAN
Kirstin Eliasen og Unn V. Johannesen

27 IKKI ALLAR KLUKKUR ERU LANDDJÓR
Agnes-Katharina Kreiling
Leivur Janus Hansen

30 GRIÐSTAÐIR - DØMD RUNNU SEG TIL FRÆLSI
Jon S. Hansen

37 GARÐSNIGIL – AFTUR EIN FERÐANDI VIÐ ONGUM PASSI
Jens-Kjeld Jensen

# FLATMAÐKURIN

## – gesturin, ið ongantíð fór heim aftur





*Høvundarnir f.v:*
*Ronja í Ey  ansstovu*
*Sóley Rein*
*Jenny Eik Ey  tórsdóttir*
*- saman vi   Jens-Kjeld Jensen*

Reyðmaðkur er eitt djór í føroysku náttúruni, ið hjálpir til at halda gongd í vistskipanini. Arbeiðið hjá maðkinum er at niðurbróta tað deyða, lívrunna tilfarið, og reyðmaðkurin eigur tí æruna av, at Føroyar hava fingið rós fyri góða mold. Tey gomlu siga, at fyrr kundu tey ikki seta spaka í mold uttan at finna reyðmaðk. Soleiðis er ikki í dag; nú skalt tú leita leingi fyri at finna ein reyðmaðk. Spurningurin er, um hetta kemst av, at fólk ikki eru eins nógv úti nú og fyrr. Ella er orsøkin tann innræsni fíggindin, flatmaðkurin.

Vit hava gjørt eina kanning við ymiskum spurningum fyri at finna útav, hvussu føroyingar hava varnast útbreiðsluna av flatmaðki í Føroyum, og um tey síggja, at reyðmaðkurin kring landið er minkaður. Til tess at stuðla undir greinina hava vit eisini tosað við Jens-Kjeld Jensen og Maritu Gulklett, ið góvu okkum eitt gott innlit í søguna hjá flatmaðkinum í Føroyum og greiddu frá vantandi vitan og reglugerðir.

Reyðmaðkur er eitt ryggleyst djór, ið gagnar náttúruni. Hann niðurbrýtur fleiri sløg av deyðum, lívrunnum tilfari, bæði frá djórum og plantum. Við hjálp frá øðrum verum í moldini ger hann tað deyða, lívrunna tilfarið um til føðsluevni, ið plantur upptaka. Á henda hátt kemur tilfarið aftur í ringrásina í náttúruni.

Fleiri túsund sløg av reyðmaðkum eru til í heiminum, og 10 av teimum eru at finna í Føroyum. Tey reyðmaðkasløgini, ið eru funnin í Føroyum, eru øll í *Lumbricidae*-ættini og hava hesi nøvn:

Áarmaðkur *Eiseniella tetraedra*
Grámaðkur *Aporrectodea caliginosa*
Roðamaðkur *Aporrectodea rosea*
Mosamaðkur *Dendrobaena octaedra*
Havamaðkur *Dendrodrilus rubidus*
Hagamaðkur *Lumbricus rubellus*
Bømaðkur *Lumbricus castaneus*
Stórmaðkur *Lumbricus terrestris*
Blámaðkur *Octolasion cyaneum*
*Octolasion lacteum* (einki fø. navn)

Harumframt hava vit kompostmaðkin *Eisenia fetita*, ið er innfluttur, og sum bert trívist í komposti.

Reyðmaðkar seta ymisk krøv til moldina, teir liva í. Teir klára seg avbera væl, har lítið av súrevni sleppur til, og tí dámar teimum væl støð, har tað javnan regnar. Tað ger Føroyar til eitt ógvuliga gott land hjá reyðmaðki at liva í - við nógvari vætu, ikki ov heitum veðurlagi og nógvum tøðum frá eitt nú seyði.

### Flatmaðkurin hevur keðiliga ávirkan

Flatmaðkurin *Artioposthia triangulata*, ið er funnin í Føroyum, kemur upprunaliga úr Nýsælandi. Hann kann gerast upp til 20 cm langur og 0,5 cm breiður. Hann er sléttur og myrkur á liti við eini ljósari rond.

Innræsin sløg eru djór ella plantur úr einum øðrum parti av heiminum, ið ikki hoyra til í teirra nýggja umráði. Tey kunnu verða innslødd í eitt nýtt øki við farmi ella tilvildarligari leysgeving, og sum oftast av fólki.

Flatmaðkurin er eitt innræsið djór, ið ávirkar lívmargfeldið í Føroyum tann skeiva vegin. Í hesum føri er tað reyðmaðkurin, ið er ofrið, tí hann er føði hjá flatmaðkinum. Flatmaðkurin etur reyðmaðkin á ein serligan hátt. Hann snýr seg rundan um reyðmaðkin og spýtir sodningarevni oman yvir hann, soleiðis at reyðmaðkurin upploysist innanífrá.

Vaksni flatmaðkurin tolir ikki frost, men í eggjahylkinum, hann leggur, er væta, ið ger, at ungarnir í egginum yvirliva, sjálvt tá frost er. Hetta er allarhelst høvuðsorsøkin til, at teir megna at yvirliva veturin. Flatmaðkinum dámar best, at hitastigini liggja millum 0 og 20 stig, og hann trívist best í vátum lendi. Hetta ger, sum áður nevnt, Føroyar til reint paradís hjá flatmaðki.

### Hetta siga føroyingar um flatmaðk

Nú eru nógv ár síðani, at flatmaðkurin gjørdi innrás, og grund er tí at spyrja, hvussu støðan hjá reyðmaðkinum er í dag. Sum tey gomlu siga, so kundi mann fyrr ikki seta spaka í mold uttan at finna reyðmaðk.

Soleiðis er ikki í dag; nú skal mann leita leingi fyri at finna ein einstakan reyðmaðk. Hóast hetta, so ýður enn í reyðmaðki í summum skorum og høgum, har illa er komandi til hjá fólki. Grundin til hetta er allarhelst flatmaðkurin, ið hevur týnt reyðmaðkin í bygdum so nógv, at hann nærum er horvin.

Á heysti 2022 gjørdu vit eina spurnakanning, ið hevði heitið "Spurnablað um maðkar í Føroyum". Hetta er ein kvalitativ kanning, har vit hava spurt fólk, hvat tey halda. Spurnakanningin var dulnevnd og varð deild á Facebook fyri at røkka so nógvum sum gjørligt. Tað vil siga, at alskyns fólk hava kunnað svarað. Tilsamans svaraðu 647 fólk runt í Føroyum. (sí mynd 1)

Spurnakanningin hevði fleiri endamál, millum annað at fáa upplýsingar, um fólk enn síggja nógvan reyðmaðk rundan um urtagarðar og runt um í bygdunum. Tey flestu, ið hava svarað, siga, at tey næstan ongantíð ella ongantíð síggja reyðmaðk í moldini, har tey búgva. (1=ongantíð, 5=ofta) (sí mynd 2)
Hetta leiðir okkum víðari til, hvussu fólk halda, at stovnurin, har tey búgva, er broyttur við tíðini. Tølini á myndini vísa, at 44,7 % halda, at stovnurin er minkaður. Næstflest, 21,4 %, hava svarað, at tey ikki vita, um stovnurin er í minking. Í triðstørsta partinum eru heili 20 %, ið halda, at reyðmaðkastovnurin er minkaður so nógv, at hann er heilt horvin. (sí mynd 3)

***Mynd 1.** Hvar b rt tú (oyggj)?* *647 svar*




***Mynd 2.** Hvussu ofta sært tú rey  ma  kar í moldini, har tú b rt?* *635 svar*




***Mynd 3.** Hvussu hev  i tú mett, at stovnurin av rey  ma  ki, har tú b rt, er broyttur gjøgnum tí  ina?* *645 svar*



## Triðingurin hevur sæð flatmaðk

Eitt annað umráðandi endamál við spurnakanningini var at fáa yvirlit yvir, hvussu nógvur flatmaðkur er í teimum føroysku oyggjunum í dag. Eitt tílíkt yvirlit gjørdu vit í spurnakanningini við at spyrja fólk, hvaðani tey vóru, og um tey hava sæð flatmaðk, har tey búgva. Tey høvdu eisini møguleika at svara, um tey høvdu sæð flatmaðk aðrastaðni í Føroyum. (Sí mynd 4)

**Mynd 4.** *Hevur tú sæ flatma k har?* *647 svar*




Sum vit síggja í mynd 4, hava 29,5 % av 647 fólkum svarað, at tey hava sæð minst ein flatmaðk, har tey búgva. 59 % hava svarað, at tey ikki hava sæð flatmaðk.

## Soleiðis kom óynskti gesturin til Føroya

Flatmaðkurin Artioposthia triongulata var upprunaliga bara at finna í Nýsælandi. Fyrstu ferð, hann var skrásettur uttan fyri Nýsæland, var í Norðurírlandi í 1963, og hagar er hann helst komin við innflutningi av blómum í potti. Útbreiðslan gekk skjótt, tí hann var longu komin til Skotlands í 1965, og seinni er hann eisini komin til Hetlands.

Fyrstu ferð, flatmaðkur var sæddur í Føroyum, var í Tórshavn á sumri 1982, tá ið flag varð lagt á løgtingshúsið. Hann breiddi seg og var komin í norðara part av Havnini í 1987.

Í 1990 var flatmaðkur funnin í Kvívík. Hetta er sama ár, sum hann á fyrsta sinni var sæddur í Íslandi (Reykjavík).

Fram til 1993 var hann skrásettur í átta støðum kring landið í Suðuroy, Streymoy, Eysturoy og Viðoy. (sí kort 1)

Í 1994 var flatmaðkur funnin í Nólsoy. Vit vita, at júst í hesum økinum í Nólsoy, har flatmaðkurin var funnin, høvdu tey brúkt setepli, ið vóru innflutt úr Skotlandi. Tað er tí ikki óhugsandi, at hann er komin haðani.

Í 2002 kom Jens-Kjeld Jensen av óvart fram á ein flatmaðk, tá hann í sambandi við eina aðra lívfrøðiliga kanning var í Svínoy og leitaði eftir smákyktum. Tað vísti seg at vera fyrsti flatmaðkur, sum var funnin í Svínoy.

**Kort 1.** *- Flatma kur sta festur upp til 1993. (Bloch, 1993, s. 27)*



Eftir hendingina í Svínoy fór Jens-Kjeld í holt við at skriva niður, nær bæði hann og onnur fyrstu ferð bóru eyga við flatmaðk. Í 2005 var skrásett, at flatmaðkur var funnin í Skúvoy og Kalsoy (Húsar). Í 2007 var hann skrásettur í Mykinesi, Kunoy og í haganum á Skála.

## Flatmaðkur í haganum

Skrásetingin av flatmaðki í haganum á Skála var áhugaverd, tí hetta var fyrstu ferð, at flatmaðkur var funnin í haganum í Føroyum. Tað sama hendi í 2008, tá ein flatmaðkur var funnin á Eiðiskolli, ið liggur væl oman fyri 200 metra hædd.

Hetta vórðu vit bilsnar um, tí í spurnakanningini fingu vit fleiri viðmerkingar um, at flatmaðkur ikki treivst oman fyri 200 metra hædd. Vit hugsaðu, at flatmaðkur bara var ein vandi í bygdum, og hildu tí reyðmaðkin vera mest sum tryggan uttan fyri bøgarðarnar. Umrøddu skrásetingarnar í haganum merkja, at støðan hjá reyðmaðkinum er álvarsligari enn væntað.

## Tann dagførda útbreiðslan av flatmaðkinum

Nú kundi mann rokna við, at flatmaðkur hevði breitt seg runt allar 18 oyggjarnar í Føroyum. Men sum bæði Jens-Kjeld Jensen og spurnakanningin hjá okkum vísa, so eru tað framvegis tríggjar oyggjar, har ongin flatmaðkur er skrásettur - í Koltri, Stóru Dímun og Lítlu Dímun. Eisini eru tað tvær oyggjar, har ongin skráseting er gjørd um flatmaðk. Talan er um Hest og Fugloy. Higartil er flatmaðkur skrásettur á 13 oyggjum kring Føroyar (sí kort 2).

## Avleiðingar av, at reyðmaðkastovnurin minkar

Fleiri fólk í spurnakanningini viðmerktu, at moldin var vorðin fastari (kompaktari), eftir at reyðmaðkurin hvarv. Tað er sannlíkt, tí reyðmaðkar gera gongdir í moldini, ið eru við til at loysa hana, soleiðis at eitt nú planturøtur vaksa djypri niður í moldina. Gongdirnar gera, at súrevni lætt sleppur niður í moldina, sum røturnar so eisini upptaka. Tað sigur tí seg sjálvt, at moldin gerst fastari, samstundis sum gróðurgóðskan minkar, tá reyðmaðkurin hvørvur. Tí hevur reyðmaðkurin ómetaliga stóran týdning fyri føroysku náttúruna og gróðurin sum heild.

Reyðmaðkur er somuleiðis føði hjá fugli, so afturgongdin av stovninum kann eisini hava avleiðingar fyri fuglalívið í Føroyum. Tað sæst tíverri longu ein afturgongd av summum fuglasløgum. Tjaldrið etur m.a. reyðmaðk, og ábendingar eru um, at tjøldrini fækkast niðan fyri bøgarðarnar, har stovnurin av reyðmaðki eisini er minkaður. Her vanta tó kanningar, men lutfallið millum fugl og reyðmaðk sær út til at vera samsvarandi.

**Kort 2.** *(Egin framlei sla)*




## Ránsdjór og ránsfæ – hvør av øðrum liva má

Í spurnakanningini nevndu fleiri, at tey høvdu lagt til merkis seinastu tíðina, at ein broyting er hend til tað betra. Tey siga, at stovnurin av reyðmaðki er farin at vaksa aftur, samstundis sum stovnurin av flatmaðki er í minking. Hetta gleddust tey um, tí nú var vón fyri framman, hildu tey.

Men tað er ikki vist, at hetta er so gott tekin, sum onkur heldur. Í vísindasøguni sæst, at náttúrufrøðingar stundum verða ávirkaðir av støddfrøðingum.

Fyri á leið 100 árum síðani komu støddfrøðingarnir Alfred Lotka og Vito Volterra fram til ein støddfrøðiligan myndil, kallaður Predator-prey interaction model. Predator-prey interaction model vísir sambandið millum tvær lívverur, eitt nú ránsdjór og ránsfæ. Í hesum føri er flatmaðkurin ránsdjórið og reyðmaðkurin ránsfæið. Stovnurin av flatmaðki veksur og trívist væl, tá ið nógvur reyðmaðkur er, men av tí sama fer stovnurin av reyðmaðki eisini at minka. Hetta kemst av, at stovnurin av reyðmaðki ikki klárar at halda sær uppi, tí flatmaðkastovnurin veksur so skjótt.

Tá ið so flatmaðkurin hevur minkað so mikið nógv um reyðmaðkastovnin, at hann sjálvur ikki megnar at halda sær uppi, gevur hetta reyðmaðkinum ein kjans at koma fyri seg aftur.

Náttúrufrøði verður sjáldan stýrd av støddfrøði, men heldur av eini natúrligari ringrás. Tað er í einari tílíkari ringrás, reyðmaðkurin og flatmaðkurin liva í.

Jens-Kjeld Jensen skrivaði fyri 15 árum síðani, at flatmaðkurin næstu 50 árini fór at eta umleið 90 % av føroyska reyðmaðkinum. Tá vit spurdu Jens-Kjeld Jensen, um hann enn helt hesa hypotesu vera sanna, váttaði hann uppáhaldið. Er hypotesan røtt, merkir tað, at stovnurin av reyðmaðki fer ongantíð at vaksa upp í 100 % aftur. Hann fer bara at klára at vaksa upp í 10 % og minkar so aftur niður á umleið 1 %.

Á talvu 1 høgrumegin sæst eitt dømi um gongdina hjá reyðmaðki og flatmaðki, um talan var um eina sunna gongd. Tá hevði stovnurin minkað í eitt tíðarskeið, men síðani klárað at vaksa upp aftur á ta upprunaligu nøgdina.



## CHARLES DARWIN

"The plow is one of the most ancient and most valuable of man's inventions; but long before he existed the land was in fact regularly plowed, and still continues to be thus plowed by earthworms. It may be doubted whether there are many other animals which have played so important a part in the history of the world, as have these lowly organized creatures."

Á talvu 2 sæst dømi um eina ósunna gongd, og sambært Jens-Kjeld Jensen er hetta tað, ið hendir við maðkinum. Hesin grafur er ikki gjørdur út frá nøkrum tølum, men er bert framleiddur til at hugleiða við. Høvdu vit havt tøl yvir báðar stovnarnar, kundi tað hugsast, at bláa linjan (reyðmaðkur) er støðugt minkað seinastu árini, grundað á tað, sum Jens-Kjeld segði um, at reyðmaðkurin fór at minka 90 %.

**Talva 1.** *Talva um sunna gongd.*
*(Egin framlei sla)*




**Talva 2.** *Talva um ósunna gongd.*
*(Egin framlei sla)*



**Mynd 5.** *Flatma kur*



## Bøta um støðuna

Hvat kann so gerast til tess at bøta um støðuna? Tað einasta, sum kann ávirka verandi støðu, er at heita á fólk um at gera av við flatmaðkar, tá tey koma fram á teir.

Tað er somuleiðis umráðandi, at vit læra av flatmaðkinum og forða fyri, at slíkt hendir í komandi tíðum, tá vit hugsa um onnur innræsin skaðakykt. Tað eru strangar lógir fyri, hvørji djór fólk hava loyvi at innflyta til Føroya. Hundar, kettur o.a. skulu koppsetast, áðrenn tey kunnu flytast inn. Men enn er ongin lóg gjørd fyri innflutning av plantum, flagi og mold. Einki eftirlit er við innfluttari mold, hóast fólk flest vita um fleiri dømi, har fremmand kykt eru komin til Føroya við slíkum innflutningi.

## Hvør er støðan, og hvat kunnu vit gera?

Niðurstøðan er, at afturgongdin av reyðmaðki ikki er nakað, fólk bara billa sær inn. Í Føroyum merkja vit longu, at stóra afturgongdin av reyðmaðki hevur sett síni spor í ta føroysku náttúruna. Tað er í stóran mun grundað á innflutta flatmaðkin, at stovnurin av reyðmaðki er minkaður so mikið nógv, at fleiri fólk halda, at hann er horvin. Tað sigst, at molddygdin, har reyðmaðkur ikki er at finna longur, er minkað, og hetta kann ikki bøtast við flatmaðki.

Tað er sjálvsagt, at okkurt má gerast, um slíkt ikki skal endurtaka seg. Tað týdningarmesta fyri Føroyar nú er at fáa eina lóg í gildi, so at tann duldi innflutningurin av fremmandum djórum og smákyktum, ið kunnu vera skaðilig fyri okkara lívfrøðiliga margfeldi, verður skerdur munandi.

Nú náttúruverndarlógin er samtykt í løgtinginum, kunnu Føroyar fyri fyrstu ferð í søguni byrja at verja náttúruna móti óynsktum innræsnum fremmandum verum.

Men flatmaðkurin er tíverri komin fyri at vera.



**Mynd 6.** *Rey ma kur*

## Keldulisti:


Aldará, Jón og Jensen, Jens-Kjeld (2019). GONGDIN HJÁ ÆÐU, TEISTA OG HEIÐAFUGLI Í NÓLSOY. Frøði (2), 10-13.

Andersen, Caspar (1997). Regnorme. Natur og Museum (4).

Bloch, Dorthe (1993). Tann stóri flatmaðkurin er komin og verður verandi. Frøði (3), 26-27.

Christensen, Ole M. og Mather, Janice G. (1992). The exotic land planarian Artioposthia triangulata in the Faroe Islands: Colonalisation and habitats. Fróðskaparrit (40), 49-60.

Christensen, Ole M. og Mather, Janice G. (1998). The New Zealand flatworm Artioposthia triangulata, in Europe: the Faroese situation. Pedobiologica (42), 532-540.

Egholm, Øssur (2022). Samrøða, 24.10.2022.

Enckell, P.H. og Rundgren, S. (1983). Terrestrial invertebrates of the Faroe Islands. V. Earthworms (Lumbricidae): Distribution and habitats. Fauna norv (4), 11-20.

Enckell, P.H. og Rundgren, S. (1988). Anthropochorous Earthworms (Lumbricidae) as Indicators of Abandoned Settlements in the Faroe Islands. Journal of Archaeological Science (15), 439-451.

Frímerki FR 208, Postverk Føroya (1991). Listafólk: Bárður Jákupsson

Gulklett, Marita og Jensen, Jens-Kjeld (2022). Samrøða 26.10.2022

Hoppensteadt, Frank (2006). Scholarpedia.org. Predator-prey model.
http://www.scholarpedia.org/article/Predator-prey_model - Vitjað: t. 28.10.2022.

Jensen, Jens-Kjeld (2001). Flatmaðkur í Nólsoy. Frágreiðing frá Føroya Fuglafrøðifelag (15), 16.

Jensen, Jens-Kjeld. (2007, 10.) jenskjeld.info. ÓÐALSTÍÐINDI OKTOBER 2007: INNFLUTT FLOGKYKT OG AÐRIR ÓYNSKTIR GESTIR.
http://www.jenskjeld.info/artikler/innflutt_flogkykt_07.htm?fbclid=IwAR2ydkJOUmEL3ye6doffNQLb86X-_gE9Wf90RDw3siD2R6rpfk2esLBoF2o - Vitjað: t. 28.10.2022.

Lógasavnið (09.07.1970). Løgtingslóg um náttúrufriðing. logir.fo
https://logir.fo/Logtingslog/48-fra-09-07-1970-um-natturufriding-sum-seinast-broytt-vid-logtingslog-nr-110-fra-29 Vitjað: t. 28.10.2022.

Lógasavnið, (18.05.2021). Kunngerð um at innflyta hundar, kettur og gitnaðarevni. logir.fo
https://logir.fo/Kunngerd/82-fra-18-05-2021-um-at-innflyta-hundar-kettur-og-gitnadarevni - Vitjað: t. 28.10.2022.



Tey gandará  ini, Pløyen sendi Finni Magnússyni, eru var  veitt á Árnasavninum í Keypmannahavn saman vi  umsetingunum hjá Jóni Sigur  ssyni og V. U. Hammershaimb. Keypmannahavn, Den Arnamagnæanske Samling, AM 972 c 4to.

# FØROYSK RÆTTSKRIVING

## *er frá 1847 – ikki 1846*

*Ta   er almenn hugsan hjá føroyingum, at stavseting teirra var   tilevna av V. U. Hammershaimb presti. Sum kunnugt var   hon fyrst n tt á prenti í greinini* Færøske Trylleformularer *í tí  arritinum* Annaler for nordisk Oldkyndighed og Historie 1846*. Hóast tí  arriti   var   útgivi  ári   eftir, halda tey flestu, at føroysk stavseting var   til ári   1846.*

*Eitt bræv, var  veitt á íslendska landsbókasavninum, avdúkar, at føroysk rættskriving ikki var til fyrr enn í 1847. Møguliga var   hon gjørd eftir bara tveimum vikum. Í hvussu er skal fø  ingarári   hjá føroysku rættstavingini broytast til 1847.*



**Seán D. Vrieland**
sean.vrieland@hum.ku.dk
Lektari
Københavns Universitet

### Søgan um rættstavingina

Í *Frøði 1/2019* og aðrastaðni lesa vit um, hvussu føroyska stavsetingin varð til í 1840-árunum. Tá í tíðini var Christian Pløyen amtmaður í Føroyum, ein dani, sum hevði stóran áhuga fyri føroyskari mentan og máli. Pløyen var eisini límur í kongaliga norðurlendska Fornritafelagnum (Det kgl. nordiske Oldskriftselskab) í Keypmannahavn, sum gav út tíðarritið *Annaler for nordisk Oldkyndighed og Historie.*

Várið 1845 savnaði Pløyen fýra stuttar føroyskar tekstir og sendi teir saman við týðingum til danskt til annan formannin í Fornritafelagnum, íslendingin Finn Magnússon. (Síðani felagið varð kongaligt í 1828, hevði kongur, nú drotningin, verið formaður). Vónin hjá Pløyen var, at hesir tekstir – fýra gandaráð úr Suðuroy – fóru at vekja áhugan hjá Finni í mun til aðrar norðurlendskar tekstir. Hetta skrivar Pløyen í einum fylgibrævi, hann sendi Finni Magnússyni, dagfest 31. mars 1845:

*“Endeligen er det lykkedes mig, at faae opskrevet 4 saadanne Formularer, og jeg tillader mig, herved at fremsende dem, ledsagede med Oversættelse, til Deres Høivelbaarenhed, i det Haab, at de ville interessere, saavel i og for sig, som ogsaa ved at sammenlignes med andre scandinaviske Productioner af samme Art.”*

Søgan um, hvussu Pløyen fekk gandaráðini, er eisini søgd í fylgibrævinum. Ein skúlalærari í Hvalba, Óli Jespersen (sum annars var óskilgitin sonur hjá J. H. Schrøter sóknarpresti), hevði savnað tekstirnar og sent teir til Pløyen í Tórshavn. Handritið, sum skúlalærarin Óli sjálvur hevði skrivað, er tíverri burturblivið.

Tá ið Pløyen fekk tekstirnar frá Óla, læt hann amtskrivstovumann sín, Jens Davidsen, reinskriva teir. Davidsen var føddur í Hvalba, sóknini hjá J. H. Schrøter, og hevði í fleiri ár tikið lut í arbeiðinum at savna og skriva føroyskar mentir saman við Schrøter. Hann hjálpti t.d. Schrøter við at týða Føroyingasøgu fyrstu ferð til føroyskt, ein týðing, sum sá dagsins ljós í útgávu hjá C. C. Rafn í 1832.

Í sínum uppskriftum av føroyskum tekstum brúktu Schrøter og Davidsen eina stavseting, sum teir høvdu ment saman við m.a. Rafn og danska málfrøðinginum Rasmus Rask. Tað vóru tó fleiri vísindamenn í Keypmannahavn, ið høvdu áskoðanir um, hvussu føroyskt átti at stavast. Ein teirra var filologurin N. M. Petersen, sum í einari grein í blaðnum Fædrelandet 13. mai 1845 skrivaði, at føroyskum máli tørvaði eitt skriftmál, sum kundi brúkast til øll málføri. Petersen eggjaði sínum lesarum við áhuga fyri málfrøði “at faae den færøske Dialekt ført tilbage til sin Rod, det Gammelnorske” við at skapa “en simpel, især med den islandske overensstemmende Skrivemaade”.

Og tað er næstan júst tað, ið hendi við føroysku rættskrivingini. Eftir at hava lisið greinina hjá Petersen fekk Rafn tað hugskot, at gandaráðini frá Pløyen skuldu umsetast til eina íslendsktlíknandi stavseting. Íslendingurin Jón Sigurðsson, sum eisini var limur í Fornritafelagnum, fekk uppgávuna og skrivaði gandaráðini við eini stavseting, ið líktist hansara egna móðurmáli. Hann brúkti t.d. ð - ein bókstavur, sum umboðaði eitt ljóð, sum langt síðani var burturfallið úr føroyskum, men sum framvegis hoyrdist í íslendskum.


Kjøbenhavn d. 10de Jan. 1847.
De her vedlagte Trylleformularer ønskes indrykkede i vore Annaler for 1846, men Orthographien bør jo forbedres efter oldnorsk og islandsk Brug, hvorom Prof. Petersen har foreslaaet i vedlagte Artikel i Fædrelandet.
Jeg anmoder Dem at De vil omskrive disse Formularer paa denne Maade, saa snart som det er Dem muligt, da Arket 22 tildeels er udsat, i hvilket disse Formularer skulle have Plads. Det var maaske ikke af Veien at conferere med Hr. Hammershaimb i tvivlsomme Tilfælde.
Ærbødigst
Rafn.
Hr. Secretair Jon Sigurdsson.

Brævi , har C. C. Rafn b  ur Jóni Sigur  ssyni at umseta gandará  ini til eina stavseting, sum líkist íslendskum. Reykjavík, Landsbókasafn Íslands — Háskólabókasafn, JS 565 4to.


FÆRØISKE TRYLLEFORMULARER. 355

Og det i Navnet Gud Fader,
Søn og Helligaand!

Held, Held anden Gang! o. s. v.
Held, Held, tredie Gang!

KJÆRLIGHEDS RIIM.

Maria lærte mig Kjærlighedsriim
hverken med Trolddom
eller noget Mundsveir.
Saa sagde den Helligaand mig:
saa være du mig kjær,
som Lam følger Faar!
Saa være du mig tro,
som Kalven i Ko!
God Kjærlighed fra Gud!
Runer (ere) i mit Sind,
Ramme Runer fare (glide) mig
igjennem mine ni Fingre!

AT LÆSE BORT SKJORBUG:

Jesus selv laa syg,
da kom hans Moder og saae derpaa:
hvi ligger du saa, min elskede Søn?
Derfor ligger jeg saa,
at mig ganger Skjørbug baade til og fra.

Stat du op og følg du mig,
ikke skal Skjørbug skade dig!
Da kom trende Draaber
af Himlen ned,
Jomfru Maria tog dem,
hun smurte dem baade paa Bryst og Side;
23*

*Færøske Trylleformularer vór u prenta ir á sí unum 347-359, sum eru tey bæ i seinastu ørkini í bókini. Ni ast á sí u 355, har sum ta sí sta arki byrjar, sæst arknummari 23.*

Sjálvur N. M. Petersen las uppskotið hjá Jón Sigurðssyni og legði viðmerkingar afturat í einum brævi til Rafn. Í sama brævi kom Petersen til ta niðurstøðu, at "en indfødt Færøbo må bestemme, hvorledes hans sprog bedst skal skrives".

Her endar uppgávan at tilevna hóskandi føroyska rættskriving hjá tí unga føroyska studentinum V. U. Hammershaimb. Hann tók uppskotið hjá Jón Sigurðssyni og tillagaði stavsetingina til nakað, ið eftir hansara áskoðan hóskaði til tað føroyska málið. Síðani henda dag hevur Hammershaimb eisini fingið heiðurin at vera "faðir skriftmálsins".

## Nær varð ritmálið skapt?

Finnur Magnússon svaraði Pløyen tann 21. juli 1845. Fáar dagar undan hesum, tann 17. juli, vórðu gandaráðini lisin upp á summarfundi Fornritafelagsins.

Jón Sigurðsson búði í Keypmannahavn og var limur í Fornritafelagnum. Men hann hevur ikki kunnað verið til staðar, tá ið gandaráðini vórðu borin fram, tí hann var heima í Íslandi summarið 1845 í embætisørindum. Tað gamla Altingið var nýliga endurreist, og Jón varð valdur inn sum tingmaður í sínari heimasýslu. Fyrsti fundurin hjá Altinginum varð hildin tann 1. juli 1845, og Jón Sigurðsson kom ikki aftur til Keypmannahavnar fyrr enn á heysti sama ár.

Men um Jón Sigurðsson ikki hoyrdi gandaráðini, tá ið tey vórðu lisin upp á fundinum, nær hevur hann so fingið tey at umseta til eina íslendsktlíknandi stavseting?

Á íslendska landsbókasavninum í Reykjavík er eitt brævasavn við savnsmerkinum JS 565 4to. Brøvini eru frá C. C. Rafn til Jón Sigurðsson, og millum teirra er eisini brævið, har Rafn býður Jóni at umseta gandaráðini. Hetta bræv er dagfest 10. januar 1847.

Brævið ljóðar soleiðis:

*"De her vedlagte Trylleformularer agtes indrykkede i vore Annaler for 1846, men Orthographien bör jo forbedres efter oldnorsk og islandsk Brug, ligesom Prof. Petersen har foreslaaet i vedlagte Artikel i Fædrelandet.*

*Jeg anholder om at De vil omskrive disse Formularer paa denne Maade, saasnart som det er Dem muligt, da Arket 22 til deels er udsat, i hvilket Ark disse Formularer skulle have Plads. Det var maaskee ikke af Veien at conferere med Hr. Hammershaimb i tvivlsomme Tilfælde."*

Bøkur vórðu tá í tíðini prentaðar í einum ella fleiri ørkum – í 16 samanlagdar blaðsíður, um talan er um áttingsbrot. *Annaler for nordisk Oldkyndighed og Historie* varð prentað í 23 ørkum (saman við trimum myndatalvum aftast), og niðast á fyrstu síðu í hvørjum arki sæst eitt tal. Ark 22, sum Rafn nevnir í brævinum til Jón Sigurðsson, byrjar á síðu 337, og "Færøske Trylleformularer" eru á blaðsíðu 347 – altso á 11. síðu í arkinum. Greinin heldur fram til síðu 359 – á hálva leið gjøgnum tað síðsta arkið.

Tá Rafn skrivar, at Arkið 22 "lutvíst er útsett", kann væl hugsast, at bókin annars var næstan búgvin til prentingar. Og tað kann eisini vera sannlíkt, tí Fornritafelagið helt ársfund tann 28. januar 1847, og tað stendur í ársfrágreiðingini, at "*Af Annaler for nordisk Oldkyndighed og Historie* udgaves Aargangen eller Bindet for 1846" (*Antiqvarisk Tidsskrift* 1847: 7). Um tað er so, at bókin kom út beint fyri ársfundin, varð føroysk rættskriving tilevnað í tíðarbilinum 10.-28. januar 1847.





## Hammershaimb leggur tveir tekstir afturat

Tað sæst í brævinum frá Rafn, at hann hevði ætlað, at tað skuldi vera Jón Sigurðsson, ið skuldi umskriva gandaráðini og harvið skapa eina dagførda føroyska stavseting eftir íslendskari fyrimynd. Rafn nevnir kortini Hammershaimb sum ein, ið til ber at ráðføra seg við, um ivamál komu fram. Hetta var, áðrenn Petersen skrivaði, at ein "innføddur føroyingur" átti at havt seinasta orðið.

Hammershaimb hevur gjørt meiri enn bert at tillaga stavsetingina hjá Jóni Sigurðssyni. Hann skrivaði eisini eina stutta innleiðslu um, hvussu føroyskt í sínum nýggja stavsetingarbúna úttalast.

Eisini hevur Hammershaimb umsett tríggjar av sínum egnu tekstum, sum hann hevði innsavnað til ta nýggju stavsetingina. Í *Færøske Sagn meddelte af V. U. Hammershaimb* endurgevur Hammershaimb tríggjar sagnir, hann hevði savnað, tá ið hann ferðaðist í Føroyum í 1841. Tað sæst í dagbók hansara, at Hammershaimb hevði skrivað ymiskt siðbundið føroyskt tilfar niður á ferðini. T.d. stendur týsdagin tann 20. juli, at hann "skrev om Eftermiddagen nogle *Totter* af". Í teimum fáu uppskriftunum frá ferðini hjá Hammershaimb, sum eru varðveittar á Árnasavninum í Keypmannahavn, sæst, at hann tá brúkti ljóðskrift til at festa tilfarið á blað við.

Sagnirnar *Risi og Kelling*, *Um Skógir í Føroyum* og *Huldufólk* eru eisini endurgivnar í *Færøsk Anthologi* eftir Hammershaimb í 1891, men tá við teirri stavsetingini, vit nú kenna sum føroyska rættskriving. Tó bregða tær eitt sindur frá í *Annaler 1846*: Føroyum stavast t.d. Føroiun, og Hammershaimb brúkar bókstavin à at endurgeva a í opnum stavilsum sum tà - eitt uppskot, sum Petersen upprunaliga skrivaði í sínum brævi til Rafn.

Hammershaimb gjørdist limur í Fornritafelagnum í 1847 og helt fram við at útgeva føroyskar tekstir við nýggju stavsetingini. Tað er gjøgnum hansara útgávur sum t.d. *Sjúrðar kvæði* (1851) og serliga *Færøsk Anthologi* (1891), at henda stavsetingin, sum frá leið varð til "ta føroysku rættskrivingina", so á mangan hátt er tað ikki skeivt at kalla hana fyri rættskrivingina hjá Hammershaimb. Tó er tað ein misskiljing at kalla hana fyri "rættskrivingina frá 1846", tí hon sá í roynd og veru ikki dagsins ljós fyrr enn í januar 1847.

## Heimildir:

Keypmannahavn, Den Arnamagnæanske Samling, Acc. 4 d. *Forskellige noter fundet i Venceslaus Ulricus Hammershaimbs hjem.*
Keypmannahavn, Den Arnamagnæanske Samling, AM 972 c 4to. *Færøske Trylleformularer.*
Reykjavík, Landsbókasafn Íslands — Háskólabókasafn, JS 565 4to. *Sendibréf C. C. Rafn til Jóns Sigurðssonar.*
*Annaler for nordisk Oldkyndighed og Historie* 1846. Keypmannahavn.
*Antiqvarisk Tidsskrift* 1846–1848. Keypmannahavn.
Hammershaimb, V. U. (1851): *Sjúrðar kvæði*. Keypmannahavn.
Hammershaimb, V. U. (1891): *Færøsk Anthologi*. Keypmannahavn.
Lindqvist, Christer (2018): *Untersuchungen zu den Gründungsdokumenten der färöischen Rechtschreibung. Ein Beitrag zur nordischen Schriftgeschichte* [= *NOWELE Supplement Series* 29]. Amsterdam / Philadelphia: John Benjamins.
Lindqvist, Christer (2019): *Hvussu føroysk stavseting varð til – gandur má hava verið uppií.* Frøði 2019/1.
Matras, Christian (1941): *V. U. Hammershaimb: Færøsk Dagbog 6.7.–16.8.1841.* Keypmannahavn.
Vrieland, Seán D. (2022): *The dating of Faroese standard orthography. Opuscula XX* [= *Bibliotheca Arnamagnæana LV*], 323–325.

## Hesi hava stuðlað verkætlanini:

– Granskingarráðið
– Augustinus Fonden
– Aage og Johanne Louis-Hansens Fond
– Dronning Margrethes og Prins Henriks Fond
– Institut for Nordiske Studier og Sprogvidenskab, KU



# NÚ ERU FÝRA SLØG

## *av ræplantum í Føroyum*

*Ta var mest sum av tilvild, at fjór a slagi av ræplantum var funni í Føroyum. Vatnplantuserfrø ingurin Jens Christian Schou leg i til merkis, at greiningin á heimasí uni hjá Jens-Kjeld Jensen av eini blø rurót var skeiv. Hann bjó a i sær til at slaggreina blø rurótina fyri Jens-Kjeld, um hann fekk hendur á eina fríska blø ru. Ta var ikki nøkur heilt løtt uppgáva, men á vári 2022 eydna ist ta Jens Christian at klúgva eina blø ru frá einari turka ari blø rurót, so hárini komu til sjóndar, og hann kundi sta festa, at talan var um trølska blø rurót* Utricularia stygia*, sum er eitt n tt slag í Føroyum.*

**Mynd 1.** *Blø rurót Utricularia vulgaris/australis.*



**Mynd 2.** *Trølsk blø rurót.*

### Trølsk bløðrurót

Higartil hava vit vitað um tríggjar ræplantur í Føroyum, men so var tað so heppið, at vatnplantufrøðingurin Jens Christian Schou vitjaði heimasíðu mína (http://jenskjeld.info/blomster.htm) og legði til merkis, at greiningin av bløðrurót *Utricularia vulgaris/australis* ikki var røtt (mynd 1).

Jens Christian Schou visti at siga, at hetta nýggja slagið var eitt av tveimum - antin var tað ein *Utricularia ochroleuca*, ella var tað ein trølsk bløðrurót *Utricularia stygia* (mynd 2 og 3).



**Mynd 3.** *Trølsk blø rurót (funnin í 2014).*

Einasti mátin at skilja ímillum hesi bæði sløgini er at klúgva eina bløðru (mynd 4) og síggja vinkulin á ersmáu hárunum, sum eru inni í smáu bløðrunum.



**Mynd 4.** *Hárini í blø runum á trølskari* bløðrurót Utricularia stygia, *Jens Christian Schou avmynda i.*

Jens Christian Schou bjóðaði sær at slaggreina bløðrurótina fyri meg, um eg kundi finna honum eina fríska bløðru (mynd 5). Tað var ikki nøkur heilt løtt uppgáva at finna plantuna aftur, men á vári 2022 eydnaðist tað Jens Christian at klúgva eina bløðru frá einari turkaðari bløðrurót (sum varð funnin í 2014), so hárini komu til sjóndar (mynd 4), og hann kundi staðfesta, at talan var um trølska bløðrurót *Utricularia stygia*, sum er eitt nýtt slag í Føroyum.




**Jens-Kjeld Jensen**
jkjensen@olivant.fo
Náttúrufrøðingur
Heiðursdoktari á
Fróðskaparsetri Føroya




**Mynd 5.** *Blø ra á trølskari blø rurót.*

Í Føroysk flora (2000) stendur vanlig bløðrurót *Utricularia vulgaris*, og at eingin hevur sæð slagið blóma í Føroyum. Men munurin á *Utricularia vulgaris* og *Utricularia australis* sæst bert, tá tær eru í blóma, so spurningurin er, hvussu tey eru komin fram til, at talan er um vanliga bløðrurót *Utricularia vulgaris*?

Í dag kundi mann valt at brúkt DNA til at eyðmerkt slagið; men tað hava vit enn til góðar.

Eisini undrist eg á, at heitið "vanlig" verður heft á eina plantu, sum er sjáldsom í Føroyum (mynd 6). Rodmund á Kelduni, Dánial Jespersen og eg hava funnið hesa bløðrurótina í 15 smáum hyljum og tjarnum í Sandoynni og Vágunum, men vit hava ongantíð sæð hana í blóma (mynd 7). So vit vita framvegis ikki, um henda bløðrurótin er annað slagið ella hitt. Fyrr vaks bløðrurót í eini lítlari tjørn í Hoyvík, men hon mátti lúta fyri sonevnda framburðinum, tá tjørnin varð fylt upp.

**FAKTA:**

Í nógv ár hevur heitið "ræplantur" verið brúkt um hesar planturnar. Men heitið er misvísandi, tí eingin av plantunum etur ræ (deyðar kroppar, lík). Hinvegin hava planturnar tað til felags, at tær fanga livandi verur, sum tær síðani eta.

Rættari hevði verið at funnið eitt heiti, ið sipaði til, at planturnar veiða ella fanga sína føði.



**Mynd 6.** *Nærmynd av vanligari blø  rurót* Utricularia vulgaris/australis.

**Mynd 7.** *Blø  rurót trívist eisini í næstan turrum hyljum og tjarnum.*





**Mynd 8.** *Rundbla  a   sóldøgg.*

bløðini. Kertlarnir gera eisini sodningarkveiki, sum verður nýtt at sodna kyktini. Plantan veksur vanliga í súrari og føðslufátækari jørð, men á hendan hátt fær hon fatur á køvievni.

**Takk til Rodmund á Kelduni, Dánial Jespersen og Maritu Gulklett fyri hjálp til kanningararbeiðið og greinina. Takk til Jens Christian Schou fyri slaggreining og mynd av hárunum í bløðrurótini.**

**Mynd 9.** *Vanligt undirløgugras.*



## Kostvanar

Bæði sløgini eru kjøtetandi og fanga smáar lívverur í fellum, sum líkjast bløðrum. Til dømis fanga bløðrurøturnar vatnloppur, daphnia og nematodur. Hóast fellurnar eru smáar, eru tær sera framkomnar:

Tá kyktið nærkast bløðruni, merkja hárini tað, og bløðran, sum er undir undirtrýsti, ger seg til reiðar. Fongurin verður síðani sogin inn, og lúkan letur seg aftur. Øll gongdin varir 10-15 millisekund.

## Hini bæði sløgini av føroyskum ræplantum

Rundblaðað sóldøgg *Drosera rotundifolia* (mynd 8) er ein óvanlig ræplanta í Føroyum, har bløðini lata seg aftur um smákykt.

Vanligt undirløgugras *Pinguicula vulgaris* er - sum navnið bendir á - ein vanlig planta í Føroyum (mynd 9). Hon etur eisini smákykt. Bløðini hava kertlar, sum gera eina klepruta vætu, sum fangar kykt til

## Próvtilfarið

Tey bæði sløgini av pressaðari bløðrurót eru í plantusavninum hjá Naturhistorisk Museum í Aarhus.

## Keldur


Fosaa, Anna Maria (2004). Ein plantufrøðiligur gongutúrur runt um Gróthúsvatn. Frøði nr. 10, s. 4-9.

Jóhansen, Jóhannes (2000). *Føroysk flora*. Eds. Fosaa, Anna Maria & Rasmussen, Sigga. Føroya Skúlabókagrunnur. Pp. 1-485.

Rasmussen, R 1970 (1952). *Føroya Flora. 2. útgáva.* Skúlabókagrunnur Løgtingsins. Pp 1-232.

Schou, Jens Christian, Bjarne Moeslund, Lars Båstrup Spohr, Kaj Sand Jensen (2017). Danmarks Vandplanter. BFN's Forlag. Pp. 1-560.




*Gamla bóndasamfelagið*

# KUNDI IKKI VELTA MEIRA KORN FYRST Í 1800-TALINUM

*Í byrjanini av 1800 var føroyska samfelagi   ta  , sum vanliga ver  ur nevnt "ta   gamla bóndasamfelagi  ". Landbrúki   var tann avgerandi høvu  svinnan, og bóndagar  urin var tann grundleggjandi sociala eindin. Har húsa  ist bóndafamiljan, vi   trimum ættarli  um, og teirra arbei  sfólk, sum vóru húskallar og arbei  skonur. Til gar  in hoyrdi jør  , sum kundi vera kongs ella ó  al, og sum gav fø  i til fólki   og til húsd rini, sum vóru sey  ur, neyt og  ross. Innflutningurin av korni um hetta mundi   var størri, enn handilin metti vera ney  ugt, og myndugleikarnir vildu tí hava føroyingar at velta meira korn. Men umstø  ur og orka vóru ikki til tess í Føroyum.*



**Rolf Guttesen**
RolfG@setur.fo
Lektari í geografi



**Mynd 1.** *Saksingardagur. Bæ  i kvinnur og menn luttaka hvør vi   sínum haka. Í Gásadali 1986. Foto: R. Guttesen*



*Mynd 2.* *Reinavelting stig fyri stig, sum ta   var gjørt í Gásadali í 1986. Tekning: S. Christiansen, R. Guttesen.*

## Hvat var problemið tá?

Í einari "Forestilling" ella áliti[1] frá 1790 verður spurt, hví tað ikki verður velt meira korn í Føroyum, og um tað ikki ber til at økja heimaframleiðsluna. Mann vildi gjarna sleppa undan at flyta so nógv korn til Føroya, tí føroyski einahandilin hevði stórt hall av hesum. Kornið bleiv keypt fyri marknaðarprís í Danmark, men selt fyri fastan og lágan prís í Føroyum, og hetta gav undirskot fyri hesa vøruna. Korn, einar 4000-5000 tunnur um árið, var tann týdningarmesta handilsvøran, ið kom til Føroya við handilsins skipum úr Danmark. Álitið frá 1790 skrivar eisini, at føroyingar brúka ov nógv korn: "Der er en afgjort Sag, at Færøerne nu for Tiden forbruge for meget Korn, just fordi det kan haves for saa let Pris."

Soleiðis var støðan eisini umleið ár 1813, sum verður tikin fram til viðgerðar í hesi greinini. Hetta tíðarskeiðið er valt, tí her er spurningurin aktuellur, og her er eitt einastandandi statistiskt tilfar, tær sokallaðu Löbners tabellirnar. Tabellirnar høvdu til endamáls at dokumentera, hvat tey einstøku húsarhaldini høvdu framleitt av føðsluevnum, í eini støðu við kríggi í Europa og kreppu og hungursneyð í Føroyum. Löbner var settur amtmaður og kommandantur á Skansanum.

Leiðandi spurningurin í hesi greinini er:

- Hvat var til hindurs fyri, at meira korn varð velt í Føroyum fyrst í 1800-talinum?

Fyrst verður greitt frá skipanini í framleiðsluni av matvøru í Føroyum, soleiðis sum hon var tá. Síðan verður víst á, hvat er neyðugt at gera, um framleiðslan av korni skal tvífaldast.

*Talva 1.* *Kaloriub ti   eftir fø  ievnum 1813*

| Ymisku føðievnini | Nøgd í eindum | Nøgd í kg | Kcal til samans | Kcal/persón um dagin | % av Kcal |
|---|---|---|---|---|---|
| Føroyskt korn | Tunnur 1.755 | 140.400 | 393.120.000 | 205 | 8 |
| Danskt korn | Tunnur 5.500 | 440.000 | 1.232 .000.000 | 643 | 24 |
| Lambskjøt | Lomb 28.100 | 337.200 | 539.520.000 | 281 | 10 |
| Tálg | Lomb 28.100 | 84.300 | 463.650.000 | 243 | 9 |
| Neytamjólk | Neyt 2.297 | 3.707.680 | 2.149.992.000 | 1.123 | 42 |
| Fiskur | - | - | - | 200 | 7 |
| Fuglur | 34.210 stk | 8.655 | 13.848.208 | 7 | 0 |
| Samanlagt | - | - | - | 2702 | 100 |
| Fólkatalið í 1813: 5247 | | | *Kelda: Löbners tabellir* | | |

1 Allerunderdanigst Forestilling, 1790, s. 13 og fleiri



## 2.1 Støðan í Føroyum umleið ár 1813

Í royndunum at gera eitt einfalt model av skipanini havi eg ikki tikið allar minni týðandi partar við, so sum grind, sum kundi svíkja fleiri ár upp í saman, høsn, dunnur, kálvar og kóp og annað. Fuglur hevði stóran týdning í nøkrum fáum bygdum, men fyri Føroyar sum heild munaði hann lítið og kundi eisini hvørva í longri tíðarskeiðum.

Tað skal dragast fram, sum talvan vísir, at høvuðskaloriukeldan hjá íbúgvunum í landinum var neytamjólk. 42 % av orkuni kom frá neytamjólk. Harnæst verður ávíst, at korn, velt her í landinum, bert var 8 % av nýtsluni, meðan tað danska, innflutta kornið var trígjar ferðir so nógv, 24 %. Hesi tøl siga okkum beinanvegin, at kúgvin og innflutta danska kornið, til samans 66 %, ella 2/3 av kaloriutørvinum, átti lívið í føroyingum. Ymist annað kundi, sum longu nevnt, hava týdning í nøkrum bygdum ella í ávísum tíðarskeiðum.

Seyðurin, sum gekk úti bæði summar og vetur, gav eisini sera ójavna úrtøku. Í bókini "Seyður í søgu og veðri" greiðir Helgi í Brekkunum frá, at í Steigahaga í Sandavági var skurðurin nakað oman fyri 1000 í 1715, men árið eftir, í 1716, vórðu færri enn 200 seyðir flettir. Tey søguligu tølini hevur hann úr sokallaðu "Lítlu Bók", sum er ein dagbók, sum løgmaður á Steig, Samuel Pedersen, førdi í árunum 1706 til 1755.

*Talva 2.* *B ti   av arealklassum eftir árstí*

| Lendi | Árstíð | Arbeiði | Framleiðsla | Konsum | Skattur |
|---|---|---|---|---|---|
| Akur | Vár: | Velting, taðing, sáing | - | - | - |
| | Heyst: | Akur-skurður | Korn | Føði | Korn-tíggjund |
| Bøur | Summar: | Gras, hoygging | Vetrarfóður | Fóður | - |
| | Vetur: | Seyður, røkt | Kjøt | Føði | - |
| Undir-hagi | Summar: | Neyt, mjólking | Mjólk | Føði | Smør-tíggjund |
| | Vetur: | Seyður, røkt | Kjøt | Føði | - |
| Yvir-hagi | Summar: | Seyður, røkt | Ull, kjøt | - | Ullar-tíggjund |
| | Vetur: | Hvíld | - | - | - |
| Fjós, køstur | Vetur: | Neyt, mjólk, sóping | Mjólk, tøð | Mjólk | Smør-tíggjund |

## 2.2 Bøur, gras og hoyggj og kýr

Tann framleiðsla, sum vísti minstu broytingar ár um ár, er grasið á bønum. Í mun til korn, seyð, fisk, fugl osfr. var úrtøkan av grasi rættiliga støðug. Grasið varð sligið aftan á ólavsøku og turkað til hoyggj. Tað bleiv borið til hús í byrðum og lagt í hoygarðin; hoyggjhús vóru ikki vanlig tá í tíðini. Hetta hoyggið var vetrarfóður hjá neytunum, sum stóðu inni í fjósinum allan veturin, frá umleið november til marsapríl; tað valdaðist um veðrið. Kýrnar vórðu mjólkaðar og góvu í miðal 4 litrar um dagin[2] alt árið.

Lendið í føroysku bygdunum var býtt sundur í bø og haga, og hagin aftur í undirhaga, sum varð brúktur til neytini um summarið og til vetrarbit hjá seyði. Yvirhagin varð brúktur til summarbit hjá seyðinum. Hartil kom fjøran, sum hevði týdning, har tari kom upp, tí tarin kundi brúkast sum tøð. Lutfallið millum bø og haga var og er framvegis ógviliga ymiskt kring landið. Svabo[3] skrivar, at í 1780 var lutfallið umleið 1:236.

## 2.3 Pláss fyri korninum í skipanini

Vanliga var tað so, at oyggjarnar sunnanfjørðs høvdu betri vakstrarlíkindir enn norðanfjørðs. Okkurt árið vóru hesar oyggjar sunnanfyri sjálvbjargnar[4] við korni. Men kornúrtøkan var ójøvn í ymsum bygdum. Fyri bygdina Norðoyri[5] á Borðoynni var kornúrtøkan millum 2 og 14 fold. Hesi stóru sveiggj í kornfram-



*Mynd 3.* *Haki hjá Dávidi Joensen í Gásadali. Tekning: R. Guttesen, 1986.*

2 Svabo s. 1529
3 Svabo s. 1206
4 Guttesen (2016)
5 Guttesen (2001, 2010)



***Mynd 4.** John Joensen og Pól Mikkelsen seta kornbundir upp í skrúgv. Í Gásadali 1986. Foto: R. Guttesen.*

leiðsluni gera, at henda grøði sum kaloriukelda ikki kann vera "samfelagsberandi". Harafturímóti vísti innflutningurin[6] av korni úr Danmark seg at vera støðugur. Tann nøgd av korni, sum einahandilin bílegði um heystið, bleiv avhend í Føroyum várið eftir, júst í somu nøgd sum bílagt. Kríggj og vanlukkur kundu órógva hesa jøvnu gongd. Sum tað niðanfyri verður víst, so var eisini neytatalið[7] og mjólkaveitingin rættiliga støðug. Innflutt danskt korn og føroysk mjólk vóru til samans 66 % av kaloriuinntøkuni. 24 % frá innfluttum korni og 42 % frá føroyskari mjólk.

Í nevndu "Forestilling[8]" frá 1790 verður støðan hjá handlinum viðgjørd og trupulleikar við møguligum fríhandli umrøddir. Her verður sum áður nevnt m.a. sagt: "Paa den anden Side kan indbyggerne [ved frihandel] vente bedre Betaling for nogle af Landets Produkter … Desuden er det en afgjort Sag, at Færøerne nu for Tiden forbruge for meget Korn, just fordi det kan haves for saa let Priis." Prísurin á korni í handlinum í Tinganesi var fastur ár um ár og hevði verið tað síðan 1691. Og hesin prísur var lægri enn innkeypsprísurin í Danmark. Handilin hevði tí stórt hall av at innflyta og selja korn.

Hetta man vera orsøkin til, at íbúgvarnir keyptu bíligt danskt korn heldur enn at velta sjálvir. "Ifald altsaa Prisen paa denne Artikel, som er den betydeligste af alle, stiger anseelig, vil de selv indskrænke den overflødige Forbrugelse." Vanligt var at hoyra, at ynskið frá føroyingum var, at prísurin skuldi verða uppaftur lægri. Eitt dømi um hetta er, at Nólsoyar Páll í 1807 fór til Danmarkar við Royndini Fríðu[9] upp á "landsins besta" at biðja um lægri prís á korni. Tað fekk hann. Men sum mótvekt hækkaði handilin prísin á øðrum vørum.

## 2.4 Taðing, kornakurin og reinavelta

Vanligt var tá í Føroyum, at eitt jarðarstykki svarandi til 1/7 part av samlaða bønum bleiv velt, taðað og sátt við frækorni. Árið eftir bleiv ein annar 1/7 partur av bønum veltur. Í eitt 7 ára skeið hevði allur bøurin verið veltur, taðaður og sáddur. Í "Hestsøgu" skrivar Jóan Chr. Poulsen[10] soleiðis um skipanina í Hesti: "Vinnan av graslendinum var sett til sjey ár; tá var jørðin vorðin forn og tørvaði at verða taðað aftur." Hetta skal skiljast so, at tá akurin hevði borið ávøkst av korni eitt árið, so skuldu ganga 6 ár, har stykkið bar gras. Eisini sigur endurgevingin omanfyri, at taðingin í sambandi við kornveltingina tað eina árið gav góðan grasvøkstur fylgjandi seks árini. Tó minkaði grasvøksturin, sum árini liðu. Somu vitan havi eg úr Húsavík, Gásadali og Norðoyri[11]. Fornfrøðingurin Mahler[12] skrivar um tað sama.

6 Guttesen (unpubl.)
7 Guttesen (2022): Kirkjutígjund
8 Allerunderdanigst Forestilling. 15. juni 1790
9 Guttesen 2019;196
10 J. Chr Poulsen 1947, p 20
11 Óli Danielsen á Breyt í Húsavík, John Joensen í Gásadali, Birni Hansen á Norðoyri
12 Mahler (2007; 249)



Hetta veltingarlag kallast "reinavelta" og hevur við sær, at 1/7 av bønum verður veltur á hvørjum ári. Samstundis er tað so, at ein "rein" verður skorin av hvørjum teigi í akrinum, og henda reinin er umleið í breidd 1/7 av teiginum. So verður stykkið saksað, tøðini borin úr køstinum út á akurin og frækornið sáað.

Sjeynda hvørt ár verður ein sjeyndingur av reinini skorin av. Velt á henda hátt, so verður alt stykkið grivið ígjøgnum eftir 49 árum.

Meginreglan í hesum er, at tøðini undan neytunum verða samlað í køstinum um veturin, meðan neytini standa á bási í fjósunum. Har hava tey etið hoyggi av øllum bønum. Nú verða tøðini breidd á bøin. Tøðini verða tó ikki breidd um allan bøin, men bert á tann sjeyndapartin av bønum, sum nú skal verða kornakur. Henda taðingin er neyðug fyri at fáa eina rímiliga fold-úrtøku av korni.

## 3.0 Ber tað til at tvífalda kornveltingina?

Um mann skal økja kornveltingina í Føroyum til tað dupulta, so krevur tað:

- ikki bert eitt dupult so stórt øki til akur,
- men eisini dupult so nógv av tøðum, sum fyri tað mesta koma frá neytunum.

Fyri at fáa dupult so nógv av tøðum, so má mann hava:

- Dupult so mong neyt til at "framleiða" tøðini.
- Dupult so mong neyt skula hava dupult so nógv av hoyggi at eta til vetrarfóður.
- Hoyggið fæst av grasinum á bønum. Tí má víddin á bønum økjast til tað dupulta.
- Hesin nýggi bøurin, ið liggur upp at gamla bønum, má legggjast inn av haganum, helst undirhaganum. Hetta ger, at tann gamli undirhagin minkar.
- Neytini plagdu at ganga á beiti í undirhaganum og noyðast tí longri burtur. Hetta ger, at tað verður longri hjá neytakonum at ganga.
- Seyðurin gekk í undirhaganum og á bønum um veturin. Nú misti seyðurin ein part av undirhaganum, men hesin partur er nú blivin bøur og kann tí væntast at geva seyðinum meira og betri vetrarfóður.

Aðrar fylgjur eru;

- Dupult so mong neyt geva dupult so nógva mjólk. Frammanundan gav mjólkin størsta partin av kaloriunýtsluni, 42 %. Men hvat kundi hendan stóra eyka nøgdin av mjólk brúkast til? Einasti máti at konservera mjólk tá í tíðini var at gera hana til smør ella ost. Nakað av smøri bleiv latið sum tíggjund og nakað selt í handlinum.
- Tann størri bøurin gevur seyðinum betri líkindir at klára veturin. Áseyðatalið kann økjast, tí, sum landbúnaðarráðgevin Hans Jacob Jacobsen, betur kendur sum Heðin Brú, sigur: "Tað er vetrarhagin, sum ásetur skipanina[13]". Tá ein partur av undirhaganum er veltur til bø, so verður grasframleiðslan av bønum størri og kann tí føða fleiri seyðir um veturin. Men framvegis fara stór sveiggj at verða.
- Fleiri seyðir geva meira kjøt og tálg. Men eisini skinn og ull. Ullin varð gjørd til hosur, sum kundu seljast til handilin fyri reiðan pening ella setast á konto.
- Tá meira varð velt av korni, so skuldi ein minni partur av korninum keypast, so har spardi mann ikki bara pening. Einahandilin skuldi eisini innflyta minni av korni. Og hetta var júst endamálið hjá myndugleikunum: at gera Føroyar minni bundnar av innfluttum korni, sum kundi minka um hallið í handlinum.

***Talva 3.** Nøkur grundleggjandi lutføll, Avrunda tøl*

| | Lutføll í 1813 | Lutføll, um kornveltingin skal tvífaldast |
|---|---|---|
| Persónar : kýr | 2:1 | 1:1 |
| Persónar : lomb | 0,14 :1 | 0,14:1 |
| Lomb : kýr | 12:1 | 6:1 |
| Innflutt : føroyskt korn | 3:1 | 1:1 |

13 Jacobsen (1957), s. 211

**Keldur:**

Allerunderdanigst Forestilling. Den 15. juni 1790. Rigsarkivet, København

Brekkunum, H. í (2017): Seyður í søgu og veðri. Tórshavn

Christiansen, S & R. Guttesen (1987): Traditionel færøsk kornavl – på film. pp. 32-36 in

- Carlsbergfondet Årsskrift 1987. København

Guttesen (2001): Plant production on a Faroese farm 1813 -1892. Geografisk Tidsskrift.

Guttesen, R. ed (2007): Emilius Löbner, 1815: Fortegnelse over Folkemængden i Færøe den

- Januar 1814, deres Ejendomme, Næringsgrene mm. Landsskjalasavnið. Tórshavn.

- <History.fo>

Guttesen (2010): veðurlag, framleiðsla og fólkatal í 1800-talinum. pp 43-65 in: Nolsøe ed:

- Brot úr Føroya søgu. Tórshavn

Guttesen (2015): Diffusión av tingum og tankum. Fróðskaparrit 62. Bók, pp 20-51

Guttesen (2016): Regionalar variatiónir í kornveltingini fyrr í tíðini. Fróðskaparrit, vol 63

Guttesen (2019): Poul P. Nolsøe - Skúmisleiv og tjóðarhetja. Tórshavn

Guttesen (2022): Kirkjutíggjund 1693-1900 sum upplýsing um skiftandi veðurlag fyrr í tíðini.

-Frøði nr 1/2022

Guttesen, (unpubl): KFH regnskaber 1740-1745. Rigsarkivet. København

Jacobsen, H.J (1957): Landbúnaður. pp 187-218 in Føroyar II, Keypmannahavn

Mahler, D.L. (2007): Sæteren ved Argisbrekka. Tórshavn 2007

Poulsen, Jóan Chr. (1947): Hestsøga. Tórshavn

Svabo, J.Chr (1782/1959): Indberetninger fra en Reise i Færøe 1781 og 1782. København

Informantar:

Óli Danielsen á Breyt í Húsavík

John Joensen í Gásadali

Birni Hansen á Norðoyri


Takk til Eyðfinn Magnussen fyri kritiska gjøgnumlesing.

Men ein annar liður er eisini í roknistykkinum, sum vit ikki hava roknað uppí enn. Tað er fólkatalið og harvið arbeiðskraftin. Hvussu kann mann sláa, hoyggja og bera inn? Hvussu kann mann velta dupult so stórt stykki, sáa og skera og turka korn? Hvussu kann mann mjólka og ambæta tvær ferðir so mongum neytum? Fyri at alt hetta kann lata seg gera, er neyðugt við dupult so stórari arbeiðsmegi.

Tey grundleggjandi lutføllini í skipanini eru sett upp í talvu 3. Og haraftrat verður víst, sum "hugsaðar proportiónir", hvussu hetta broytist, um kornveltingin tvífaldast. Fólkatalið er sett at vera óbroytt.

## 4. Niðurstøða og perspektivering

Roynt verður í hesi grein at seta eina hugmynd upp, sum vísir, hvussu ymsu liðirnir í framleiðsluskipanini hanga saman og ávirka hvør annan. Ein niðurstøða er, at tað ber ikki til í tí gomlu skipanini at økja um kornveltingina uttan samstundis at økja um tøðmongdina. Fyri at hetta skal bera til, er eisini neyðugt at økja um neytatalið, hoyggið, bøin og annað mangt. Og alt hetta krevur, at arbeiðskraftin eisini verður størri, og tí er neyðugt við størri fólkatali í Føroyum. Men veksur fólkatalið, so verður tann størra kornframleiðslan at býta millum fleiri fólk. Og hvat er so vunnið?

Um vaksið verður um bøin, so minkar undirhagin, har neytini ganga á beiti um summarið. Neytini mugu tí finna beiti longri burturi frá bygdini. Men tað kann hugsast, at setur-drift kundi loyst nakrar av hesum trupulleikunum. Mahler[14] hevur skrivað drúgva frágreiðing um "Sæteren ved Argisbrekka". Hann sigur: "Ærgi må formodes at have betydet noget i retning af sommergræsning (for kvæg); sæter; sæterhus." Hetta, at hava ergi, var kanska ein loysn, sum lá eini 400-800 ár ella longri afturi í søguni enn 1813.

Tann søguliga gongdin upp gjøgnum 1800-talið og víðari upp til okkara tíð vísir, at tað bar til at umskipa samfelagið, og at fólkatalið kundi økjast. Nýggir vinnuhættir, nýggj mentan og nýggjur hugburður vuksu fram.

Nevnast kann í stuttum: Traðarmannabrúkið, útróður við áttamannaførum, og seinni fiskarí við deksbátum og sluppum, og so fríhandil. Lat meg stutt nevna, at tann nevnda "Forordning 1777"skipar so fyri[15], at ognarleys, aftan á 4 ára tænastutíð hjá bøndum, hava rætt til at fáa eitt jarðarstykki ávíst, sum kann veltast til trøð. Hetta hendi hóast áhaldandi mótstøðu frá bóndum[16].

Tað gamla bóndasamfelagið var ein framleiðsluskipan, sum var lagað til natúrligu og samfelagsligu umstøðurnar, sum vóru í Føroyum fyrst í 1800-árunum. Men henda skipanin var ikki før fyri at breyðføða fólkið í Føroyum. Korn bleiv tí innflutt, og serliga ull varð útflutt. Grasið á bønum var tann álítandi avgrøðin, og við kúnni sum millumliði var mjólkin tann tryggasta og størsta kaloriukeldan hjá føroyingum.

So, í svarinum til ríkismyndugleikan, sum spyr, eru vit komin til tað úrslit, at undir galdandi framleiðsluskipan, soleiðis sum hon er umleið ár 1800, ber ikki til at velta meira korn.

14 D.L. Mahler (2007;327)
15 Guttesen (2019;46-47)
16 Guttesen (2015; 25-25)





*Kanningar av sjósílum í Føroyum:*

# VARPA LJÓS Á NÝGGJA VITAN

Nógvir føroyingar hava gjøgnum tíðirnar verið góðir við síl og áhugaðir í sílum. Kortini er grundleggjandi vitanin um føroysku sjósílini ikki stór. Nógvar eygleiðingar eru av, hvussu síl hátta sær, og nógvar metingar eru um, hvussu stovnurin er fyri ymisku árini. Sílaveiðufólk kenna eisini sera væl sílini á støðunum, har tey standa við tráðu, men tíverri er sera lítið fest á blað. Fiskaaling hevur seinastu fýra árini gjørt rannsóknir av føroysku sjósílunum, sum vit lýsa úrslitini av í hesi greinini.

Eftir áheitan frá Havbúnaðarfelagnum fór Fiskaaling í 2019 undir at granska føroysk sjósíl. Granskingararbeiðið fevnir um tríggjar verkætlanir:

1. Fella, ið stóð í Sandá millum Argir og Tórshavn frá apríl til juli í 2019-2022. Hendan hevði til endamáls at savna inn sjósílasmolt, ið var á veg á sjógv. Hesar kanningar vístu, nær sjósílasmoltið fór á sjógv, umframt hvussu tey vóru fyri, og hvørjar umstøðurnar vóru tá.
2. Brævbjálvar við roðslu og aðra vitan um síl, ið sílafiskarar høvdu fingið og síðani sent Fiskaaling.
3. Veiða av sjósílum við gørnum. Undantaksloyvi var fingið til at veiða 50 síl um árið við gørnum nærhendis landi. Í 2021 og 2022 vórðu gørnini sett á tveimum plássum, har annað umboðaði síl, ið liva nærhendis laksaaling, og hitt umboðaði síl, ið liva langt frá laksaaling.

Síl (*Salmo trutta*) eru laksafiskar (Salmonids). Allur laksafiskur gýtir í vatni, men hevur eginleikan at fara á sjógv. Hjá sílum er tó ymiskt, nær og um tey fara á sjógv. Tey, ið fara á sjógv, kalla vit sjósíl, og tey, ið ikki fara ella ikki hava møguleikan at fara, verða kallað áar- ella vatnasíl. Tá ið síl fara á sjógv, fara tey frá at vera brúnlitt til at verða meira silvurlitt.

### Fellan í Sandá

Í 2019 setti Fiskaaling upp eina fellu undir brúnni við handilin Eikina, ið gongur tvørtur um Sandá (Mynd 1). Fellan leiddi øll síl, ið ferðaðust á sjógv, í ein uppsamlingskassa. Uppsamlingskassin varð vitjaður dagliga, har íkomnu sílini vórðu doyvd, longdarmátað og vigað, og roðsla var tikin til aldursgreiningar. Tá ið sílini vaknaðu aftur, vórðu tey slept. Tað vóru tó dagar, har ið nógv áarføri var, og áin gjørdist ov stór til felluna. Hesar dagar sluppu síl óivað.

Kanningin í Sandá vísti m.a., at stórur munur kann vera á, nær ið sjósílasmoltið leitar sær á sjógv á fyrsta sinni. Ein vanligur máti at áseta, nær ferðingartíðarskeiðið hjá sjósílasmolti í høvuðsheitum er, er við at nýta tíðarskeiðið, tá ið helmingurin av samlaðu nøgdini fer á sjógv. Í 2022 fór hesin helmingurin á sjógv í tíðarskeiðinum frá 9. til 21. mai, meðan hann í 2020 fór á sjógv í tíðarskeiðinum 10. til 28. juni. Harvið er staðfest, at høvuðstíðarskeiðið, tá ið sjósílasmolt leita sær á sjógv á fyrsta



**Kirstin Eliasen**
kirstin@fiskaaling.fo
Phd
Fiskaaling



**Unn V. Johannesen**
unn@fiskaaling.fo
Lívfrøðingur, MSc





*Mynd 1. Sílafellan í Sandá.*




*Mynd 2. Árligi munurin á, nær helmingurin (50%) av samla u nøgdini av sjósílasmolti fer a ist á sjógv í 2019-2022 í mun til hita og avfall.*

sinni, kann sveiggja við í minsta lagi einum mánaði millum ár.

Tá ið fellan varð vitjað, varð hitin á vatninum eisini mátaður, og samanumtikið ber til at siga, at sjósílasmoltið leitar sær á sjógv við fyrsta áarføri, eftir at hitin á vatninum er komin upp á umleið 8-10 hitastig (Mynd 2).

## Sílini hjá sílafiskarunum

Roðsla kann samanberast við nytrur og viðarbular, tað ber nevniliga til at avgera aldurin á fiskinum, ið roðslan var tikin av, við at telja árringar á roðsluni. Hetta verður gjørt við at leggja roðsluna undir eitt mikroskop. Á roðsluni ber m.a. eisini til at lesa, hvussu leingi sjósílið var í feskum vatni, áðrenn tað fór á sjógv.

Stórur partur av roðsluni frá sílunum, ið eru fingin við gørnum, og við brævbjálvunum, ið sílafiskarar hava sent inn, er aldursgreinað. Úrslitini vísa m.a., at flestu sjósíl leita sær á sjógv fyrstu ferð sum tvey ára gomul, umframt at tey, ið einans vóru tvey ár í feskum, áðrenn tey leitaðu sær á sjógv, longu frá fyrsta ári eru størri enn tey, ið vóru trý ár í feskum (Mynd 3). Hesin munurin sæst, líka til sílini eru seks ára gomul, men tá ber ikki longur til at finna ein hagfrøðiliga signifikantan mun, møguliga tí at sera fáir seks ára gamlir fiskar eru fingnir higartil, og taltilfarið tískil er ov lítið.

Mynd 3 vísir eisini, hvussu týdningarmikil tíðin á sjónum er fyri vøksturin hjá sjósílum. T.d. eru síl, ið eru farin á sjógv sum tvey ára gomul, sum trý ára gomul nærum 10 cm longri enn eitt javngamalt síl, ið var eitt ár longur í feskum, áðrenn tað fór á sjógv.








*Mynd 3. Mi al longd vi ymiskan aldur hjá sjósílum, i vóru ávikavist tvey og tr ár í feskum, á renn tey fóru á sjógv fyrstu fer .*

Av tí at síl er ein laksafiskur, kunnu tey á sjónum fáa laksalús (*Lepeophtheirus salmonis*). Hesar kunnu hava neiliga ávirkan á teirra trivnað, og í ringasta føri verða orsøk til, at sílini ikki yvirliva tíðina á sjónum. Tá ið sílafiskararnir senda inn brævbjálvar við roðslu, ber til hjá teimum at viðmerkja á brævbjálvan, hvussu nógvar lýs vóru á sílinum, teir fingu. Hesi tølini vísa, at í tíðarskeiðinum frá 2019 til 2022 byrjaðu sílini at hava lús í apríl, høvdu flestar lýs í juli, og at tey í oktober aftur ongar lýs høvdu (Mynd 4). Av tí at hetta er júst øvuta mynstrið í mun til tað, sum er í alivinnuni, har alilaksurin í miðal vanliga hevur flestar laksalýs um veturin og fægst um summarið, kann hetta vera ein ábending um, at síl fara niðan í áirnar at lúsa seg av. Laksalúsin tolir nevniliga ikki feskt vatn. Av tí at síl eisini kunnu fáa eitt annað slag av lús, ið kallast seiðalús (*Caligus elongatus*), ber ikki til við vissu at siga, hvørt allar lýsnar vóru laksalýs.




*Mynd 4. Mána arligt mi altal av lús á sílunum, i sílafiskarar fingu tí arskei i 2019 til 2022.*




***Mynd 5.** Munur á, hvussu væl sílini vóru fyri (Fulton´s K), umframt hvussu nógvar laksal s sílini á plássum vi  og langt frá laksaaling høvdu í 2021 og 2022. Ymiskir stavir merkja, at munurin á mi  altølunum er hagfrø  iliga signifikantur.*

### Veiðan við gørnum

Við tað, at laksaalingin er soleiðis skipað, at nógvur laksur er savnaður á einum lutfalsliga lítlum øki, er ikki óhugsandi, at talið av laksalús er ónatúrliga høgt á plássum, har laksaaling er. Fyri at kanna, um síl, ið liva á plássum við laksaaling, eru verri fyri enn síl, ið liva langt frá laksaaling, vóru í 2021 og 2022 sett gørn í Fámjin, ið liggur langt frá laksaaling, og í 2021 í Øravík og í 2022 í Vági, har aling er nærhendis á báðum plássunum.

Úrslitini vístu, at sílini í Fámjin bæði árini vóru betur fyri (høvdu eitt hægri Fulton´s *K*) enn í Øravík og Vági; tó var eisini munur millum árini í Fámjin, t.e. sílini í 2021 vóru betur fyri enn tey í 2022. Men tá ið hugt varð at laksalýsnum, var eingin hagfrøðiligur munur á sílunum, hvørki millum ár ella pláss (Mynd 5).

### Samanumtikið

Kanningarnar higartil hava víst, at sjósíl í høvuðsheitum ferðast á sjógv á fyrsta sinni sum tvey ella trý ára gomul, og at hetta hendir í samband við áarføri, tá ið hitin í ánni er komin upp á eini 8-10 hitastig. Tá ið ferðingin hendir í samband við hita og regn, ið kunnu sveiggja millum ár, sveiggjar tíðarskeiðið, har sílasmolt ferðast á sjógv, eisini.

Av tí at sílini hava flest lýs um summarið og fáar ella ongar um veturin, kann hetta benda á, at sílini lúsa seg av í feskum vatni. Tá ið sílini fara á sjógv, tí at føðimøguleikarnir eru betri har, vaksa tey eisini betur á sjónum. Munurin á vøkstri á sílum, ið fara fyrr á sjógv, samanborin við vøksturin á sílunum, ið eru longur í feskum, er týðiligur. Tískil er ikki óhugsandi, at vøksturin á sílum verður verri, um tey mugu stytta um tíðina á sjónum fyri at lúsa seg av. Men hóast munur var á, hvussu sílini á plássum við laksaaling og langt frá laksaaling vóru fyri, bar ikki til at seta hetta í beinleiðis samband við talið á laksalús á fiskinum.

Aftur í ár ber til at senda roðslu frá sjósílum til Fiskaaling og vera við í lutakastinum um 10.000 skattafríar krónur. Meira um hetta kann lesast á fiskaaling.fo.

### Keldur:


Eliasen K, Johannesen UV, Petersen S, Danielsen E and Bergkvist KSG (2023) Annual report – the sea trout project. Fiskaaling rit: 2023-02. https://fiskaaling.fo/media/3071/sea-trout-project-annual-report-2022_.pdf






*Vatnkálvur (Agabus bipustulatus).*
*Mynd: Erling Ólafsson.*

# IKKI ALLAR KLUKKUR ERU LANDDJÓR

## *- vatnklukkur í Føroyum*

Tá ið klukkur verða nevndar, hugsa fólk flest um tær heldur stóru og skjótu svartaklukkurnar, eitt nú bláa svartaklukku. Flest øll hava sæð tær í haganum ella í egnum garði. Men ikki allar klukkur eru landdjór. Summar liva í hyljum, áum og øðrum vátum umhvørvi. Í minsta lagi seytjan sløg av vatnklukkum eru at finna í Føroyum, og í hesi grein gjøgnumganga vit í stuttum hesi sløgini við nýliga tilevnaðu føroysku nøvnum teirra.


**Agnes-Katharina Kreiling**
agnes@savn.fo
Lívfrøðingur
Landdjóradeildin
Tjóðsavnið


**Leivur Janus Hansen**
janus@savn.fo
Lívfrøðingur
Landdjóradeildin
Tjóðsavnið

Vatnklukkur í Føroyum hoyra til fimm ymiskar ættir: Vatnkálvaættin (Dytiscidae), vatnstígaraættin (Haliplidae), kavklukkuættin (Hydrophilidae), díkisklukkuættin (Helophoridae) og mýriklukkuættin (Scirtidae).

Við so nógvum ættum er tað ikki løgið, at tað er sera ymiskt, hvørjum búøkjum klukkurnar eru í, og hvussu teirra lívsháttur er. Bæði ormverur og vaksnar klukkur liva í vatni og vátum lendi. Fleiri sløg eru at finna í fúnandi lívrunnum tilfari sum lorti og følnaðum vøkstri.

Hóast hesi búøki heilt greitt kunnu tykjast vera á turrum, so er lívvirki og skap hjá verunum, sum búleikast her, tillagað eins og hjá teimum, sum liva í vatni. Tær skulu megna at vera í einum umhvørvi við lítlum súrevni, og tær hava eitt skap, sum ikki tekur nógva mótstøðu á seg, tá tær grava ella "svimja" ígjøgnum evju. Føroysku sløgini av vatnklukkum finna sær føði á ymiskan hátt. Nøkur teirra eru slúkin ránsdjór, sum veiða ryggleys dýr, onnur sløg eta fúnandi tilfar ella eru plantuátarar.

## Vatnkálvaættin (Dytiscidae)

Í Føroyum er vatnkálvaættin tann største vatnklukkuættin. Her eru sjey av teimum seytjan sløgunum. Tey eru øll ránsdjór, og bæði ormverur og vaksin flyta seg nógv. Vaksnu kálvarnir, sum vit kalla dýrini í vatnkálvaættini, svimja skjótt, men kunnu eisini flúgva. Kroppurin er avrundaður, og afturbeinini eru fløt við longum hárum, sum verða brúkt eins

### Yvirlit yvir vatnklukkur í Føroyum

| Føroyskt navn | Vísindaligt navn |
|---|---|
| **Vatnkálvaættin** | **Dytiscidae** |
| Vatnkálvur | *Agabus bipustulatus* |
| Reyðskallakálvur | *Hydroporus erythrocephalus* |
| Dimmkálvur | *Hydroporus memnonius* |
| Svartkálvur | *Hydroporus nigrita* |
| Flekkukálvur | *Hydroporus palustris* |
| Loðkálvur | *Hydroporus pubescens* |
| Rípukálvur | *Boreonectes multilineatus* |
| **Vatnstígaraættin** | **Haliplidae** |
| Gullstígari | *Haliplus fulvus* |
| **Kavklukkuættin** | **Hydrophilidae** |
| Mosakavari | *Anacaena globulus* |
| Mykjukavari | *Cercyon haemorrhoidalis* |
| Strandkavari | *Cercyon littoralis* |
| Sankukavari | *Cercyon marinus* |
| Rotkavari | *Megasternum concinnum* |
| **Díkisklukkuættin** | **Helophoridae** |
| Foyrudíkisklukka | *Helophorus aequalis* |
| Bløðrudíkisklukka | *Helophorus brevipalpis* |
| Rukkudíkisklukka | *Helophorus flavipes* |
| **Mýriklukkuættin** | **Scirtidae** |
| Eitismýriklukka | *Elodes pseudominuta* |



*Rípukálvur (Boreonectes multilineatus) Mynd: Agnes-Katharina Kreiling*

og árar. Undir vatni anda kálvarnir luft úr eini luftbløðru, sum teir goyma undir ryggskjøldrunum, og vit síggja oftast kálvarnar, tá teir koma upp til vatnskorpuna at fylla meira luft í bløðruna.

Vatnkálvur er eitt navn, sum fleiri kennast við, og Mikkjal á Ryggi nevnir vatnkálv í *List of Faroese animal names* frá 1942. Møguliga av misgáum leggur hann tað navnið til slagið *Hydroporus pubescens*. Tað er tó *Agabus bipustulatus*, sum eigur at verða nevnt vatnkálvur. Hetta er tann vatnklukkan, sum flest leggja merki til, tí við 10-12 mm kropslongd er hetta største og mest eyðsýnda vatnklukkan í Føroyum.

Tað slagið, sum mest er til av, og sum er at finna á flestu støðum, er rípukálvurin (*Boreonectes multilineatus*). Hann hevur eitt vakurt mynstur av svørtum rípum á gula ryggskjøldrinum. Hini fimm sløgini av kálvum hoyra øll til slektina *Hydroporus*, sum eru lítlar myrkar klukkur, sum ikki eru lættar at kenna mun á.

## Vatnstígaraættin (Haliplidae)

Vatnklukkurnar í vatnstígaraættini eru plantuátarar og liva í vøkstrinum í støðuvatni. Stígarar svimja ikki stórvegis, men koma runt við at stíga upp á skift við beinunum. Eittans slag er kent í Føroyum, gullstígari (*Haliplus fulvus*). Slagið tykist ikki vera eins vanligt og tey í vatnkálvaættini, men finst í størri vøtnum, til dømis Toftavatni.

## Kavklukkuættin (Hydrophilidae)

Hóast kavklukkurnar verða roknaðar sum vatnklukkur, liva fleiri av sløgunum ikki í vøtnum ella áum. Í staðin eru tey at finna í ymsum vátum og ráligum umhvørvi sum mosa, mykju, rotandi tara og følnaðum vøkstri. Øll fimm sløgini í Føroyum eru lítlar (1,5 - 3,5 mm), myrkar, skyggjandi klukkur við sera kúputum baki og við einum lítlum bølluskapi uttast á kampunum.

Tvey sløg av kavklukkum í Føroyum, mykjukavari (*Cercyon haemorrhoidalis*) og rotkavari (*Megasternum concinnum*), eru sera vanlig í ráligum seyða- og rossalorti. Tvey onnur sløg eru at finna tætt at sjógvi og vatni: strandkavari (*Cercyon littoralis*), sum er við sjóvarmálan í rotnandi tara, og sankukavari (*C. marinus*), sum er í vátum mosa og rotnandi vøkstri fram við hyljum og í áarbakkanum.



Einans mosakavari (*Anacaena globulus*) livir veruliga í vøtnum og hyljum, men harumframt er hann eisini at finna í vátum mosa og seyðalorti, burtur frá vatni.

## Díkisklukkuættin (Helophoridae)

Díkisklukkur finna vit vanliga í mórutum støðuvatni, so sum í lítlum tjørnum og hyljum, og har eta tær ymsan vøkstur. Í mun til flestu vatnklukkur eru díkisklukkur heldur avlangar og flatar. Eitt eyðkenni fyri ættina er, at klukkurnar hava vøkur metalskyggjandi, kornut mynstur av foyrum á høvdi og hálsskjøldur.

Tey trý sløgini, sum eru skrásett í Føroyum, eru foyrudíkisklukka (*Helophorus aequalis*), bløðrudíkisklukka (*H. brevipalpis*) og rukkudíkisklukka (*H. flavipes*). Foyrurnar hjá teimum eru eyðkendar fyri hvørt slagið, og nøvnini eru givin við støði í hesum.

## Mýriklukkuættin (Scirtidae)

Mýriklukkur eru knýttar at mýrilendi, og einans eitt slag, eitismýriklukka (*Elodes pseudominuta*), er funnið í Føroyum. Tað er ein heldur fløt, nakað loðin, brúnlig klukka við longum kampum.

Ormverurnar hjá eitismýriklukkum vaksa í rennandi vatni, meðan tær vaksnu eru at finna í ráligum umhvørvi á landi. Tær tykjast heldur sjáldsamar í Føroyum og eru funnar í veitum og áum, eitt nú í Vágum, Suðuroy og Viðoy. Nýggjastu skrásetingarnar eru frá einum løki og vátum mosa í Koltri.

Tær vaksnu eitismýriklukkurnar liva stutt og síggjast bara ein sera avmarkaðan part av árinum. Hetta er kanska ein orsøk til, at vit hava funnið so fáar í Føroyum.

### Viðkomandi lesnaður:

Foster, G.N. & Hansen, J. (2004): Wetland Coleoptera of the Faroe Islands [Klukkur í vátlendi í Føroyum]. Fróðskaparrit 52: 42-53.
Hansen, J. & Foster, G.N. (2009): Elodes pseudominuta (Coleoptera: Scirtidae) in the Faroe Islands [Elodes pseudominuta (Coleoptera: Scirtidae) í Føroyum]. Fróðskaparrit 57: 113-114.
Hansen, L.J. & Kreiling, A.-K. (2022): Small islands, small ponds, small communities – water beetles and water boatmen in the Faroe Islands. Insects 13: 923.

*Gullstígari (Haliplus fulvus). Mynd: Agnes-Katharina Kreiling*



*Í Nólsoy skuldi tann dømdi renna 2,5 km út á Farsælagjógv og sleppa fram vi  for  ingum. Tekning: Janus Dam Guttesen*

# GRIÐSTAÐIR Í FØROYUM Í FORNUM DØGUM:

## *Dømd runnu seg til frælsi*




**Jon S. Hansen**
jons@mail.fo
M.A. í søgu


*Í Føroyum eru fleiri sagnir um stø  , har fólk í gomlum døgum kundu fáa gri  , um tey vóru dømd fyri álvarsom brotsverk. Fleiri av hesum stø  um hava nøvn, sum antin í fyrra ella seinna li  i kunnu setast í samband vi   gamla trúgv. Í hesi grein fari eg at grei  a frá trimum gri  stø  um í Føroyum. Søgufrø  ingar vita ikki um tílík stø    í hinum nor  urlondunum, men tá i   eg setti meg í samband vi   Hetland, var ø  rvísi. Eg fari tí eisini at grei  a frá trimum rættiliga spennandi stø  um í Hetlandi, sum kunnu geva okkum meira vitan um, hvussu gri  skipanin í Føroyum virka  i.*

### Griðstaðurin Farsælagjógv í Nólsoy og forni tingstaðurin á Stólinum

Ovarliga í Nólsoynni, nakað niðan fyri Eggjarklett, sum er hægsta punkt í oynni, er eitt áhugavert stað frá fornari tíð. Hetta er ein lítil grýtutur hamari, sum verður nevndur *Stólurin*. Um hálvantriðja kilometur longri úti er eitt annað og ikki minni áhugavert stað, nevnt *Farsælagjógv*. Hesi bæði støðini hava samband hvørt við annað.

Farsælagjógv sæst týðiliga á kortinum, so hon er løtt at finna, men verri er við Stólinum. Í Nólsoy kom eg í prát við tann søgukøna Marnar á Skúr, og eg spurdi hann, um Stólurin sást frá bygdini. Hann peikaði mær á ein lítlan hamara nakað niðan fyri Eggjarklett. Jú, hetta skuldi vera staðið, har deyðadómar blivu sagdir í fornum døgum, greiddi Marnar mær frá, men megnaðu teir at koma sær út í Farsælagjógv[1], so vóru teir frælsir.

Í Nólsoy eru tvær sagnir um, at dómstólur skal hava verið á Stólinum[2] í fornum døgum. Sagt varð: *„at kundi tann, ið var dømdur til deyðis á Stólinum, renna út eftir oynni gjøgnum mangar og ringar meinbogar og sleppa í Farsælagjógv, tá var hann fríur".*

Henda gjógv er um tveir fjórðingar frá Stólinum. Eftir søgnini varð sagt, at: *"tá tann dømdi byrjaði at renna, kemur hann fyrst til Knúk, har fyrsti dysturin stóð. Síðani til Melina, har eisini nakað gekk fyri seg, sum eingin nú veit um at siga. Við Skákið skuldu einir 5-7 mans royna at skáka hann av. Kundi tann dømdi sleppa um skákið og í gjónna, so var hann fríur."*

Úr eini aðrari søgn verður sagt, at: *"tá onkur fór til dóms niðan á Stól, so var gingið fyrst niðan á Kross. Har fullu tey til knígga og ristu kross fyri seg. Síðani gingu tey niðan Krossmannastíggj, beina leið til Stólin"*[3].

Eftir at hava prátað við Marnar á Skúr, helt eg leiðina út móti Korndali og víðari niðan í brekkuna gjøgnum Krossmannastíggj. Túrurin niðan á Stólin skal ikki undirmetast, tí brekkan er tung, og tað tók væl yvir ein tíma at koma niðaná.

Komin niðan á Stólin, spyri eg meg sjálvan, hví í allari víðastu verð teir skuldu fara heilt her niðan fyri at avsiga deyðadómar. Hví ikki bara avsiga dómin niðri í bygdini?

Eftir at hava steðgað við Stólin eina løtu, legði eg leiðina út móti Farsælagjógv. Ávegis út kundi eg ikki annað enn ímynda mær tað ræðuliga drama, sum sambært søgnini má vera farið fram, tá ið tann dømdi er farin stórleypandi út eftir oynni, bókstaviliga fyri lívinum; og tú kanst eisini ímynda tær, at fólkið, ið var hjástatt, hevur runnið rópandi aftaná fyri at eygleiða, hvussu leikur først - fór hann nú at klára tað ella ikki?



*Úts ni   frá Farsælagjógv ni  an móti Stólinum. Mynd: Jon S. Hansen*

Tað hevur ikki bara verið sum at siga tað at fingið grið í Nólsoy. Teinurin frá Stólinum og út til Farsælagjógv er heilar 2,5 km, og harumframt skuldi tann dømdi klára at koma fram við trimum forðingum, har 5 - 7 mans á eina staðnum skuldu royna at fanga hann – ella, sum tað verður sagt - skáka hann av. Vit fáa ikki at vita, hvørjir hesir menn vóru, og hvør hevði útvalt teir til hesa uppgávu. Tað fara aðrar sagnir niðanfyri at geva okkum eina ábending um.



*Stólurin er lítli gr tuti hamarin, i   sæst ovast á myndini. Mynd Jon S. Hansen*

### Tingskipanin í miðøldini

Vit vita ikki fyri vist, hvussu lógarviðurskiftini vóru í Føroyum, áðrenn Magnus Lógbøtari fór undir at skipa lógirnar av nýggjum í seinnu hálvu av 1200-talinum. Gulatingslógin nevnir smærri tingstaðir, eins og fleiri staðarnøvn og sagnir í Føroyum geva okkum ábendingar um gamlar tingstaðir afturat teimum vanligu 6 sýslutingunum í oyggjunum. Fleiri av hesum kunnu setast í samband við ástaðardómar, men onnur av dømunum benda á veruligar tingstaðir. Hinvegin verður einki nevnt um griðstaðir úti í náttúruni, og tí kunnu vit hugsa, at henda skipan hevur okkurt við gamlar katólskar kirkjulógir og gamla siðvenjulóg at gera.

Føroyar høvdu í miðøld somu støðu í norska ríkinum sum Hetland, og vit høvdu tætt politiskt og juridiskt samband tann vegin.[4] Tí er áhugavert at samanbera við Hetland. Hetland var býtt upp í fleiri smærri rættareindir, nevndar "heruð". Heruðini í Hetlandi vóru í fleiri førum rættiliga

1 Marnar á Skúr nevndi hana fyri Farsálígjógv

2 Teir gomlu nevndu eisini staðið fyri á Hvassastóli (ella Vassastóli), tí har skuldu teir hvassastu dómarnir sigast, ið vóru deyðadómar. Egon Hansen Nólsoy Søgubrot og fólk Egið forlag 2009

3 Egon Hansen Nólsoy Søgubrot og fólk Egið forlag 2009

4 Hetta sæst týðiliga í Seyðabrævinum, har tað eru Sjúrður, løgmaður í Hetlandi, og Ellindur, bispur úr Føroyum, sum eru við til at skriva lógarritið fyri Hákun Magnusson, sum var hertugi yvir hesum báðum oyggjabólkum frá 1284, og fram til hann gjørdist Noregs kongur í 1299.

smá. J. Jacobsen greiðir í 1890 frá, at tann lítla oyggin Fetlar í Hetlandi var býtt upp í trý heruð, og á oynni Yell vóru upprunaliga fleiri heraðsting á oynni. Seinni tykist tað bara at hava verið ein tingstaður mitt á oynni. Eftir at Landslógin hjá Magnusi Lógbøtara kom í 1274, varð Hetland býtt upp í eini 12 tingøki við einum løgtingi á Tingwall. Hetta var gjørt sum liður í eini sentralisering av norska kongsvaldinum[5].

Landslógin var eisini kunngjørd í Føroyum. Spurningurin er tí, um Føroyar somuleiðis upprunaliga vóru deildar upp í heruð. Vit vita ikki um nakað staðarnavn ella søgn, sum sipar til hetta, men máliskan: “at fólk komu úr øllum heraðshornum” kann vera ein veik ábending um, at vit møguliga hava havt eina líknandi skipan. Í øllum førum er sannlíkt, at Føroyar eins og Hetland hava verið býttar upp í fleiri smærri løgfrøðiligar eindir. Spurningurin er, um nakar griðstaður var knýttur at løgtinginum í Føroyum, ella tað bara var í smáum tingstøðum í útjaðaranum, sum t.d. í Nólsoy? Tað skulu vit kanna niðanfyri.

## Griðstaður: *Sælingarhella* í Tórshavn - Løgting, upprunaliga Alting

Tá tú gongur frá Kongabrúnni og út á Tinganes og er komin hálva leið, kemur tú til eina hellu, sum stingur seg fram undan vegnum, oman móti sjóvarmálanum. Henda hella verður nevnd *Sælingarhella*[6], og er hon um 100 metrar frá Tinganeshelluni, har tingið kom saman í gomlum døgum at avsiga dómar. Søgn er, at eitt smalt sund ella ein kluft var millum Tinganeshelluna og land, og um ein deyðadømdur maður megnaði at leypa av Tinganeshelluni og tvørtur um sundið[7] og síðani renna inn á Sælingarhellu, varð hann sælingur og bjargaður undan deyðarevsingini[8].

Henda søgn greiðir ikki frá so nógvum smálutum, men um hon verður samanborin við søgnina úr Nólsoy, so eru tað nøkur ting, sum ganga aftur. Eitt nú gongur orðið „sæl“ aftur bæði á griðstaðnum í Nólsoy og í Havn. Somuleiðis eru forðingar á báðum støðum, munurin er tann, at í Havn er bert ein forðing, meðan tað eru tríggjar í Nólsoy. Tað tykist tó at hava verið munandi lættari at vunnið sær grið í Havn enn í Nólsoy. Eitt nú er teinurin til griðstaðin í Nólsoy heilar 2,5 km, meðan tað einans eru um 100 metrar til griðstaðin í Havn. Men vit hoyra onki um, at nakar rennur eftir ella roynir at fanga tann dømda, sum tey gjørdu í Nólsoy. Næsta søgnin greiðir okkum nærri frá tí fyribrigdinum.



Megna  i ein dey  adømdur ma  ur at leypa av Tinganeshelluni og tvørtur um sundi og sí  ani renna inn á Sælingarhellu, var hann sælingur og bjarga  ur undan dey  arevsingini.

## Griðstaður: *Halganarsteinur*, Kollafjørður, sýsluting: Tinggarðurin í Kollafirði

Í Kollafirði er gomul søgn, at tá ið várting varð hildið í Tinggarðinum við Sjógv, vóru menn í summum førum dømdir í gálgan. Tann, ið heingjast skuldi, fekk møguleikan at renna undan løgrættumonnunum frá Tinggarðinum og inn til Halganarstein og síðan leypa av bakkanum og út á henda steinin[9]. Kláraði hann tað, var hann halgaður, tvs. at hann misti ikki lívið. Men kláraði tann dømdi ikki at leypa út á steinin, varð hann leiddur út gjøgnum fjøruna eystureftir til gálgan, sum var ein stórur klettur, sum ein planki lá á skrá yvir. Hesin klettur lá dygst oman móti sjóvarmálanum, niðan fyri húsini í Homrum, nakað eystan fyri kirkjuna.

Eitt stykki er brotnað úr Halganarsteini, so í dag kann mann ikki leypa út á hann. Men fyrr í tíðini kláraðu smádreingir væl at leypa út á steinin[10]. Frásagnir eru um, at ting hevur verið hildið við Sjógv, áðrenn Tinggarðurin varð bygdur. Guðrun Rubeksen úr Tórshavn, f. Djurhuus, ið var ættað úr Tinggarðinum, greiddi mær frá, at ein stórur steinur, ið varð nevndur *Tingsteinurin*, stóð framman fyri Tinggarðin, tá ið hon var smágenta. Hesin steinur var ein leivd frá einum gomlum tingstaði á staðnum, áðrenn Tinggarðurin var bygdur.

Tað, sum ger hesa søgn so áhugaverda, er, at hon greiðir okkum frá, at tann dømdi fekk møguleikan at renna undan løgrættumonnunum inn á Halganarstein. Tað gevur okkum eisini eina ábending um, at løgrættumenninir møguliga eisini runnu eftir tí dømda av Tinganesi, sjálvt um søgnin har ikki nevnir tað. Eins og í søgnini úr Tinganesi, so skal tann dømdi klára fram við einari forðing, við tað at hann skal leypa av bakkanum og út á steinin. Men her eins og á Tinganesi er tað munandi lættari at fáa frælsið, enn í Nólsoy, tí í Nólsoy vóru tríggjar forðingar. Teinurin frá Tinggarðinum til griðstaðin á Halganarsteini er eins og á Tinganesi munandi styttri, einans um 450 metrar, í mun til um 2,5 km í Nólsoy. Navnið “halg” er skilt við navnið “sæl”, so vit síggja, at fleiri ting ganga aftur.

Í Føroyum vita vit lítið og einki um griðstaðir í altingstíðini, áðrenn vit fingu løgrættumenn. Rann nakar eftir teimum dømdu tá, og hvørjir mundu teir vera, sum runnu eftir tí dømda í Nólsoy? Hetta kunnu sagnir úr Hetlandi møguliga geva okkum eitt svar uppá.



Gri  sta  urin Sælingarhella sæst stinga seg fram undan vegnum mi  skei  is á myndini, og Tinganeshellan ytst til vinstru á myndini. Mynd: Jon S. Hansen

## Griðstaður í Hetlandi: *Skuldigert* - heraðsting á Stelnaheelenagro

Á norðara parti á oynni Yell í Hetlandi, miðskeiðis millum støðini Gloup og Brake, eru tvey merkisverd søgulig støð. Tað eina er ein stór grá hella, nevnd *Stelnaheelenagro*, har eitt ting skal hava verið. Henda hella liggur á einum berum og fløtum øki[11]. Slakar 400 metrar haðanífrá er staðið, sum verður nevnt *Skuldigert*, sum á føroyskum kundi itið *“Skuldargarður[12]”*. Har á staðnum er ein hálvklingrutur flaggarður, sum sambært søgnini skal hava verið ein griðstaður, og hesi støð hava samband við hvørt annað.

Tann gamli  Robert Henderson (1855-1944), sum var úr bygdini Brake nærhendis, greiddi soleiðis frá hesum báðum støðum (leysliga umsett):

*Fyrr í tíðini var hetta ein tingstaður, har rætturin kom saman. Rætturin avhoyrdi teir ymisku partarnar fyri at finna fram til, um nøkur ákæra skuldi reisast. Um ákæra varð reist, og dómur feldur, so fekk lógbrótarin møguleika til at renna til ein griðstað nærhendis. Tann kvikasti persónurin, sum var á staðnum, skuldi so renna eftir honum fyri at fanga hann. Um fólkið metti, at lógbrótarin onkursvegna var darvaður, t.d. av skaða, sjúku, vøkstri ella aldri, so fekk lógbrótarin eitt forspring, alt eftir hvussu hann var fyri. Um lógbrótarin varð fangaður, áðrenn hann náddi yvir til Skuldigert ánna, sum var griðstaður, varð hann mettur at vera*



Í Kollafir  i skuldi tann dømdi renna undan løgrættumonnunum frá Tinggar  inum og inn til Halganarstein og sí  an leypa av bakkanum og út á steinin. Tekning: Janus Dam Guttesen

5 Brian Smith. On the nature of tings: Shetland`s law courts from the middle ages until 1611. The New Shetlander no. 250, 2009.

6 Víst hevur verið á, at navnið heldur vísir til hellu, har hestar vórðu saðlaðir hjá teimum, ið luttóku á tingi. Men hartil siga reiðfólk, at hestur helst skal saðlast á sløttum og vallaðum lendi, eftirsum hann lætt kann glíða á hellu. Hartil kann heldur hugsast, at hestar og ross hava gingið á beiti nakað burturfrá, meðan ting hevur verið hildið. Somuleiðis verður víst á, at GI hevur stavað hetta staðarnavn øðrvísi, men staðarnøvnini á kortinum hjá GI vísa seg at hava ógvuliga nógvar feilir og misskiljingar.

7 Ført hevur verið fram, at sund (ella kluftin, sum tað eisini verður nevnt), ikki hevur verið á Tinganesi. Til hetta kann sigast, at eitt sund nýtist ikki at vera breitt, og at Tinganeshellan og økið har á leið er fult av djúpum kluftum. Har Suðuroyargjógvin hevur verið, sum var eystari munni av sundinum, sæst í øllum førum heilt væl, sjálvt um hon er fylt upp við gróti. Somuleiðis sæst glopp millum grótið niðast móti sjóvarmálanum undir Sjóbúðini, har sagt varð, at vestari munnin av sundinum var. A. Degn nevnir eisini í Varðanum nr. 22 (s. 165 - 166), at Sjóbúðin upprunaliga varð bygd í 1703 á træpelum, sum stóðu á vánaligum botni. Húsið var skjótt oyðilagt av ormi, og mátti takast niður longu í 1719, og bygt upp aftur í 1720-unum. Víðari nevnir hann, at grótið, ið var nýtt sum ífylla myllum Tinganes og landið, varð sprongt á Helluni í Trøð.

8 Havnar Søga 1 høvundarnir og Tórshavnar kommuna 2004 Jens Pauli A. Nolsøe Kári Jespersen

9 Louis Zachariasen sigur í hesum sambandi, at deyðadømdur maður kundi í gomlum døgum bjarga lívinum við at gera roysni.

10 Øssur av Steinum; Ólavur av Steinum 2022.

11 Navnið á helluni seta málfrøðingar í samband við “Stellingartanga” í Tórshavn, sum verður sagt at vera ein gamal avrættingarstaður. Tann føroyski staðarnavnaserfrøðingurin Eivind Veyhe hevur hjálpt til at greina hetta navn.

12 Høvundurin setur hetta navnið í samband við tað at vera skyldigur (sekur), sum eisini ljóðar sannlíkt. Men sjálvur haldi eg, at tað eisini kundi verið sett í samband við navnið á nornuni Skuld, sum ráddi yvir lagnuni hjá fólki.

Gri sta urin Halganar-steinur. Eitt stórt stykki er brotna úr tí partinum av steininum, sum vendir ni an móti bakkanum. Mynd: Jon S. Hansen



*sekur og revsaður har, alt eftir hvørja revsing rætturin hevði avgjørt, at hann skuldi hava. Men um lógbrótarin náddi yvir um Skuldigert ánna, áðrenn maðurin, ið jagstraði hann, fangaði hann, varð hann mettur at vera ósekur.*[13 14]

Tað, sum kemur fram her, minnir ikki sørt um tað, sum sagnir í Føroyum greiða frá. Og av tí, at hetta er ein fjarskotin tingstaður, minnir hetta serliga um søgnina úr Nólsoy. Her er eisini ein forðing, sum í hesum førum er ein á. Áhugavert í hesi frásøgnini er eisini, at rætturin tók fyrilit fyri lógbrótarum, ið onkursvegna vóru darvaðir, og at fólkið á staðnum hevði ávirkan á hetta[15].

## Griðstaður: *Tingwall kirkjutorn*

Frá skjølum og lokalum sagnum vita vit, at rætturin á Tingwall sat á tinghólminum á Tingwall vatninum. Hólmurin var knýttur at landi við løgasteinum. Á hólminum vóru 3 – 4 stórir steinar, har rætturin sat[16]. Tey hjástøðu sótu á grasfløtuni inni á landi framman fyri kirkjuni. Tey, sum skuldu hava eina sak fyri, stóðu tætt oman móti vatnstrondini, framman fyri hólminum. Tá ið teirra sak kom fyri, og



Í Hetlandi eru dømi um, at ein dømdur ma ur fekk fyrimun ella forspring, um hann t.d. var lamin. Tekning: Janus Dam Guttesen

13 Danny Jamieson og Brian Smith. Steelnaheelenagro and Skuldigerth: Rough justice in medieval Shetland. The New Shetlander no. 298, 2022.

14 Takk til Paul Moar fyri umseting úr lokalari dialekt til enskt.

15 Frá gamlari tíð hevði rómverskur rættur givið dømdum lógbrótarum loyvi at søkja sær hjálp frá mætum vinum ella frá lokala fólkinum. Hetta, sum varð nevnt: “provocatio ad populum”, var søguliga knýtt at tí stjórnarskipanarliga prinsippinum um, at rætturin til at fáa ein persón dømdan lá hjá fólkinum og ikki hjá aðalinum. Fólkið hevði rætt til at tala at, men tað var ikki altíð, at lurtað varð eftir teimum (Shoemaker 2011: 31; 76). Í einari komandi útgávu fara vit at hyggja nærri at hesum, eins og aðrar sagnir úr Føroyum og Hetlandi verða greinaðar.

16 Hesir blivu sprongdir sundur í 1774, fyri at gera pláss til beitið.



dómur skuldi sigast, og um dómarin ynskti at avhoyra viðkomandi, bleiv hesin róptur út á hólmin. Um viðkomandi fekk deyðadóm og kundi renna eftir løgasteinunum inn á land og bróta seg gjøgnum fólkamongdina uttan at verða fangaður og taka um kirkjutornið á Tingwall kirkjuni, varð hann frælsur. Kirkjutornið var tá í tíðini griðstaður fyri lógbrótarar og skuldarar, ið vórðu jagstraðir av lánveitarum[17].

## Griðstaður: *The Tingwall stone*

Hesin steinur[18] verður eisini sagdur at hava verið ein griðstaður í gomlum døgum. Steinurin er í Tingwall dalinum, slakar tveir kilometrar frá tingstaðnum.[19] Lokalar sagnir greiða frá, at um ein deyðadømdur kundi renna frá Tinghólminum, gjøgnum dalin og yvir til henda steinin uttan at verða fangaður av ættarfólkinum hjá ofrinum, fekk viðkomandi grið[20].

Vit síggja her, at tað eru tveir ymiskir griðstaðir knýttir at tinginum á Tingwall. Tað kann hugsast, at Tingwall steinurin, sum stendur slakar tveir kilometrar frá Tinghólminum, var tann upprunaligi griðstaðurin. Tá so kirkjan varð bygd í 1100-talinum, er kirkjutornið á henni vorðið høvuðsgriðstaðurin. Kirkjan stendur tættari við Tinghólmin, og tí gjørdist tað lættari hjá tí dømda at søkja grið, enn tað var frammanundan. Frá søguni um the Tingwall stone hoyra vit, at tann dømdi skuldi renna undan ættini hjá ofrinum og ikki undan einum útvaldum persóni, eins og á oynni Yell. Og tann dømdi fekk bert grið, um hann náddi yvir til steinin, áðrenn ættarfólkini hjá ofrinum fangaðu hann. Men vit vita ikki, um tað her, eins og úr søguni frá oynni Yell omanfyri, varð tikið atlit til, um tann dømdi onkursvegna var darvaður, og um fólkið her eisini hevði ávirkan á hetta? Tað vita vit ikki, men tað kann væl hugsast.

Í hinum førinum skuldi viðkomandi renna inn til kirkjutornið gjøgnum fólkamongdina. Hugsast kann, at hetta eisini er farið fram undir skipaðum viðurskiftum, og at ættin hjá ofrinum ella ein útvaldur persónur hevur runnið eftir viðkomandi. Eftir at løgtingsskipanin er vorðin innførd, er tað væl hugsandi, at tað hava verið løgrættumenninir, sum hava runnið eftir tí dømda, eins og vit hoyra í søgnini frá Halganarsteini í Kollafirði, og at tað í altingstíðini hevur verið ættin hjá ofrinum ella




Figure 14. Yvirlit yvir Gri sta ir í Føroyum. Kort Helgi Michelsen fornfrø ingur Tjó savni .

ein útvaldur persónur, sum hevur runnið eftir tí dømda.

Um ein dømdur náddi til ein griðstað, varð hann ikki tikin av døgum, men hann misti vanliga allar sínar ognir og varð vístur av landinum. Til hann var sloppin av landinum, varð hann í katólskari tíð

Tingwall hólmurin har tingi í Hetlandi helt til í gomlum døgum, sæst uttast til høgru á myndini. Hann er í dag landfastur. Núverandi kirkjan sæst uttast til vinstru á myndini. Hon er bygd á sta num, har tann gamla kirkjan stó . Savnsmynd



17 Brian Smith. On the nature of things: Shetland`s law courts from the middle ages until 1611. The New Shetlander no. 250, 2009.

18 Steinurin verður eisini nevndur “The Murder Stone”. Hetta navnið verður sett í samband við eitt maktstríð, sum fór fram við henda stein í 1300-talinum, har fleiri mans lótu lív.

19 Takk til Jenny Muray fyri mynd og fyri at vísa mær á henda steinin.

20 Samuel Hibbert-Ware. A Description of the Shetland Islands: Comprising an Account of their Scenery, Antiquities and Superstitions (1822) Reprinted 1891.

*The Thingwall Stone. Tingsta urin er í hinum endanum á vatninum. Mynd: Jenny Murray*




**Keldur:**

Brian Smith. On the nature of things: Shetland's law courts from the middle ages until 1611. The New Shetlander no. 250, 2009.

Egon Hansen. Nólsoy - søgubrot og fólk. Egið forlag 2009.

Jens Pauli A. Nolsøe og Kári Jespersen. Havnar Søga 1. Høvundarnir og Tórshavnar kommuna 2004.

Danny Jamieson og Brian Smith. Steelnaheelenagro and Skuldigerth: Rough justice in medieval Shetland. The New Shetlander no. 298, 2022.

Karl Shoemaker. Sanctuary and Crime in the Middle Ages, 400-1500. Fordham University Press New York 2011

Louis Zachariasen. Føroyar sum rættarsamfelag 1535–1655. Føroya Fróðskaparfelag 1961.

Samuel Hibbert-Ware. A Description of the Shetland Islands: Comprising an Account of their Scenery, Antiquities and Superstitions (1822) Reprinted 1891.

A. Degn. Staðarnøvn fram við sjónum frá Kirkjubønesi til Hoyvíkar. Varðin nr. 22. Felagið Varðin 1942.

**Munnligar frásagnir:**

Gudrun Rubeksen, 1997.

Øssur av Steinum og Ólavur av Steinum, 2022.

Marner á Skúr, 2023.


vardur av kirkjuni. Hetta var ein skipan, sum kongsmaktin og kirkjan samstarvaðust um.

### Samandráttur

Um vit hyggja at mannagongdunum fyri at fáa grið í teimum føroysku sagnunum, so vísa tær seg í høvuðsheitum at vera sera líkar við lokalum frábrigdum. Sagnirnar úr Hetlandi minna rættiliga nógv um tær føroysku og eru við til at styrkja um trúvirðið á teimum føroysku sagnunum. Har eru mannagongdirnar somuleiðis líkar við lokalum frábrigdum[21]. Øll tey føroysku staðarnøvnini tykjast at hava sakralan uppruna. Soleiðis er ikki í Hetlandi. Kortið, ið vísir aðrar griðstaðir í Føroyum, gevur okkum eina ábending um, at vit hava havt eina griðskipan, sum hevur virkað um alt landið[22]. Tað er undranarvert, at griðstaðir úti í náttúruni, sum teir, ið eru nevndir í hesi greinini, tykjast at vera ókendir í hinum norðurlondunum. Men at hetta fyribrigdið er væl kent í Hetlandi, kundi bent á eina ávirkan sunnanífrá. Lógargrundarlagið undir griðskipanini er ikki kent í teimum gomlu norsku landskapslógunum, men byggja upp á gamlar katólskar kirkjulógir,[23] ið hava við kirkjugrið[24] og siðvenjulóg at gera. Tað eru enn nógvir ósvaraðir spurningar um hetta evnið, so kannað verður víðari til eina komandi útgávu, har onnur støð eisini verða viðgjørd. Um lesarin veit um okkurt annað griðstað, er viðkomandi vælkomin at venda sær til høvundin.

21 Ein má hava í huganum, at hetta eru fyrndargamlar sagnir vit viðgera, har sumt kann vera lagt aftrat, og annað dottið burtur.
22 Suðuroyggin er ikki við í hesum yvirlitinum, men vit hava sagnir um kirkjugrið í Suðuroy, sum byggir upp á sama lógargrundarlag.
23 Fyrstu ferð, vit síggja lógir um halgustøð niðurfeldar í lóg, er í Codex Theodosianus í ár 438 og í Codex Justianus í ár 535 (Shoemaker 2011: 9-10).
24 Takk til Ditlev Tamm fyri at vísa mær á bókmentir um kirkjugrið.



# GARÐSNIGIL – aftur ein ferðandi við ongum passi




**Jens-Kjeld Jensen**
jkjensen@olivant.fo
Náttúrufrøðingur
Heiðursdoktari á Fróðskaparsetri Føroya


Vit eru ongantíð í uppisetri við evnum at skriva um, tí alsamt frætta vit um nýggj innslødd sløg av skordýrum, sniglum, plantum og øðrum, sum eru funnin í Føroyum. Hesi sløgini hava tað til felags, at tey helst høvdu verið nógv færri í tali, um Føroyar høvdu eina nútímans náttúruverndarlóg.

Í 2013 høvdu vit eina dagførda grein í Fróðskaparriti, sum snúði seg um nýggj sniglasløg í Føroyum. Tá vistu vit ikki um garðsnigil í Føroyum. Men av tí, at ongar avmarkingar eru, tá plantur verða innfluttar, var tað bara ein spurningur um tíð, nær garðsnigil fór at koma til Føroya. Nú er at vóna, at føroyska summarið er ov kalt til, at hann trívist her; men væntaðu veðurlagsbroytingarnar kunnu hava við sær, at eisini garðsnigil fer at trívast her.

**FAKTA:**

FO Garðsnigil, DK Plettet voldsnegl, UK Garden Snail, LATÍN *Cornu aspersum*, samheiti Helix aspersa.

Garðsnigil ferðast skjótt, mesta ferðin er upp í 47 metrar um tíman.



*Mynd 1. Gar snigil á Toftum 18. august 2020.*

Fyrsta skráseting av ynglandi kjarrsnigli í Føroyum var í 2003, og nú er hann rættiliga vanligur í stórum parti av landinum. Mynd 4 vísir tey 3 sniglasløgini við húsa, sum eru nevnd her.

## Útsjónd og onnur líknandi sløg

Garðsnigil (mynd 1) er ein sera vakur snigil, sum livir á landi og hevur sniglahús. Tvørmátið á sniglahúsinum er 2,5-4,0 cm (eitt sindur minni enn hjá burgundarsnigli *Helix pomatia* (mynd 3). Húsið hjá garðsnigli hevur myrkari rípur, og mynstrið kann vera sera ymiskt millum teir eintøku sniglarnar.

Garðsnigil kann mistakast fyri kjarrsnigil *Arianta arbustorum* (mynd 2), sum er minni og flatari.



*Mynd 2. Kjarrsnigil.*

*Mynd 3.* *Burgundarsnigil í Nólsoy 2013. Sera bleikt eintak.*



## Elskaður á borðiskinum, men hataður sum innræsin

Garðsnigil livdi upprunaliga í londunum kring Miðjarðarhavið og norður til miðskeiðis í Europa, men hevur síðani spjatt seg longur norðureftir. Summastaðni er hann sleptur út, og aðrastaðni er hann innsløddur við plantum, so nú finst garðsnigil frá USA til Nýsæland og enntá í Suðurafrika. Innsløddir garðsniglar kunnu hava stóra ávirkan á uppruna-plantur og upprunalig sniglasløg. Danmark liggur á leið á norðurmarkinum fyri útbreiðslu av garðsnigli, men um veðurlagið broytist, sum væntandi er, kann talið av garðsniglum skjótt gerast nógv størri. Eins og aðrir sniglar elska teir regn.

## Lívsringrás

Garðsnigil er tvíkynjaður. Tó kann hann ikki gita seg sjálvan, so hann má finna ein maka fyri at yngla. Afturfyri fáa báðir partarnir ungar. Umleið 14 dagar eftir paringina verpa teir upp í 80 rund perluhvít egg, sum eru 4 mm í tvørmáti. Garðsnigil kann verpa upp í 6 ferðir árliga.

Frá tí at eggið er klakt, til garðsnigil er fullvaksin, ganga 2 ár.

## Aling

Í 1989 vórðu umleið 3000 burgundarsniglar innfluttir til Havnar, men veðurlagið vísti seg at vera ov kalt til sniglaaling (mynd 3). Helst er hetta slagið ikki longur til í Føroyum.

Garðsnigil verður eisini aldur til matna, men enn hevur eingin innflutt garðsnigil til Føroya við hesum endamáli.

## Fundir av garðsnigli í Føroyum

Higartil veit eg um 8 fundir seinastu árini. Eg havi spurt meg fyri á Tjóðsavninum, og tey hava ongar upplýsingar um garðsnigil.

*Mynd 4.* *Frá vinstru: Tveir burgundarsniglar, í mi juni tveir gar sniglar og høgrumegin tveir kjarrsniglar.*





Hoyvík 12. mai 2014 - móttikið snigil frá Hildur Nielsen

Tórshavn umleið 2015 við gamla kirkjugarðin á Svínaryggi - persónlig boð frá Jan Sørensen

Tórshavn 15. juli 2016 - myndir frá Dagfinni Højgaard

Hoyvík 12. august 2020 - mynd frá Høgna Viderø

Toftir 18. august 2020 - móttikið snigil frá Magnus Paula Poulsen

Hoyvík 11. mai 2021 - móttikið snigil frá Bjarka Gyldenkærne Dalsgarð

Skála 24. august 2021 - móttikið snigil frá Lív Joensen

Sørvágur 29. mai 2022 - móttikið snigil úr urtapotti frá Sóley H. Gásdal

## Eftirlýsing

Eg eftirlýsi upplýsingar um nýggjar fundir av garðsnigli, og eg frætti eisini fegin, um onkur hevur funnið albino svarta snigil *Arion ater*, sum eg einans havi hoyrt um eina ferð frá norðara parti av Kalsoynni (mynd 5).

## Takk

Til Jógvan í Beiti fyri myndir av albino svarta snigli, og til Dagfinn Højgaard fyri tey føroysku snigla-nøvnini, og til áðurnevndu persónar fyri at siga mær frá, tá tey hava funnið sniglar.

## Keldur

Jensen, J-K., Hansen, J. F. & Nolsø Á. 2014. Seven species of land-snails (Gastropoda) new to the Faroe Islands / Fyrsta staðfestingin av sjey landsniglasløgum. Fróðskaparrit 61: 190-209

Jensen, J-K. 2022. http://www.jenskjeld.info/FO_side/sniglar.html

Kerney, M. P. and Cameron, R. A. D. 1979. A field Guide to the land snails of Britain and North-west Europe. Collins. London. 288 bls.

Pfleger, V. & J. Chatfield 1988. A Guide to Snails of Britain and Europe. Hamlyn, England. 216 bls.

Wikipedia. Helix aspersa. (http://en.wikipedia.org/wiki/Helix_aspersa)



*Mynd 5.* *Albino svarti snigil í Kalsoy 2017 (Mynd: Jógvan í Beiti).*

# FRØÐI *í tríati ár*




Fyrsta Frøði varð prentað í juni 1993. Sostatt hevur Frøði 30 ár á baki í summar. Frøði hevur verið trúfastur fylgissveinur hjá lesarunum, tí bara í einstøkum førum er blað dottið burturímillum. Nú sæst Frøði eisini á netinum, og vónandi kunnu vit seinni í ár leggja fram eitt høvunda- og evnisyvirlit fyri allar greinarnar, ið hava staðið í Frøði hesi 30 árini.

Frøði kann lesast á netinum á hesum leinkinum:
**https://frodskaparfelag.fo/frodi/frodi-utgavur/**